# BØRN

## við sálarligum og/ella sosialum avbjóðingum

TILMÆLI



At fáa børn at trívast, mennast og læra í fólkaskúlanum



# BØRN

## við sálarligum og/ella sosialum avbjóðingum

## TILMÆLI

## At fáa børn at trívast, mennast og læra í fólkaskúlanum

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður í
Barna- og útbúgvingarmálaráðnum



Útgevari: Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Útgivið: januar 2023
Talgild útgáva (PDF fíla) kann takast niður av heimasíðuni hjá BUMR.fo
Uppseting: Anna & annað

# Innihaldsyvirlit


1. Stuttur samandráttur . . . . . . . . . . 6
2. Átøkini í tilmælinum . . . . . . . . . . 7
2.1 Kostnaður og tíðarætlan . . . . . . . . . . 7
3. Inngangur . . . . . . . . . . 8
4. Arbeiðssetningur . . . . . . . . . . 10
5. Um tilmælið . . . . . . . . . . 11
6. At nágreina málbólkin . . . . . . . . . . 14
7. Verandi skipanir . . . . . . . . . . 16
7.1. Skipanir innan skúlaverkið . . . . . . . . . . 16
7.2 Skipanir innan heilsuverkið . . . . . . . . . . 27
7.3 Skipanir innan almannaverkið . . . . . . . . . . 29
8. Snávingarsteinar og átøk . . . . . . . . . . 32
8.1 Fleiri hendur . . . . . . . . . . 32
8.2 Betri karmar . . . . . . . . . . 35
8.3 Skjótari hjálp . . . . . . . . . . 39
9. Keldulisti . . . . . . . . . . 44

# 1. Stuttur samandráttur

Tað er okkara mál og ynski, at øll børn í Føroyum trívast, mennast og hava góða sálarliga heilsu bæði í skúlanum og uttan fyri skúlan. Vit eiga at skipa okkum so, at okkara stovnar og skúlar fremja trivnað, menning, læring og góða sálarheilsu. Somuleiðis eiga vit at skipa okkum so, at vit við røttu átøkunum til røttu tíð kunnu hjálpa teimum, ið hava hjálp fyri neyðini, áðrenn avbjóðingarnar verða til stórar og álvarsligar trupulleikar. Fyri tey, ið hava brúk fyri aðrari tænastu, skal henda vera atkomulig, dygdargóð og samskipað.

Tá vit tosa um barnsins menning, læring og sálarliga heilsu í breiðum týdningi, er eyðsæð, at hetta ikki er ein uppgáva, sum skúlaverkið kann ella skal lyfta einsamalt. Foreldur, dagstovnar, skúlar, frítíðartilboð, heilsuverkið, almannaverkið, ítróttafeløg og mong onnur eru í dag við til at lyfta uppgávuna, men vit kunnu øll gera meira. Neyðugt er við átøkum tvørtur um geirar og tvørtur um fakmørk. Trivnaður, menning og læring fyri øll børn í einum breiðum høpi er ein yvirskipað samfelagslig uppgáva saman við heimliga umhvørvinum, t.d. foreldrum o.ø.

Tó at fremja trivnað, læring, menning og sálarliga heilsu er ein samansett uppgáva. Tí er neyðugt at luta sundur fyri at koma fram til skilagóðar loysnir.

Arbeiðsbólkurin hevur valt at skipa átøkini undir yvirskriftirnar: *fleiri hendur, betri karmar* og *skjótari hjálp*. Hetta tí vit í bólkinum hava brúkt nógva orku at nágreina málbólkin, og eru vit komin fram til, at hetta tilmælið í veruleikanum kann koma til at fevna um øll børn, í eitt styttri ella longri tíðarskeið, í minni ella størri mun. Tí mælir arbeiðsbólkurin til átøk, ið eru ætlað at hjálpa, tá avbjóðingar vísa seg, men eisini onnur átøk, sum eru við til at økja tilvitið um læring, menning, trivnað og sálarligu heilsuna hjá øllum børnum.

Átøkini í tilmælinum taka støði í frymlinum Multi Tier Support System hjá Kearney, C. A., & Graczyk, P. A. (2020). Ein nærri lýsing av frymlinum er at lesa á síðu 12 í tilmælinum. Orsøkin til, at vit í arbeiðsbólkinum, hava valt at taka støðið í honum er, at vit meta, at hann kann gera myndina einfaldari, so at skilja, at átøkini í lag 1 fevna um áhaldandi og fyribyrgjandi átøk, meðan lag 2 og 3 fevna um interventión og rehabilitering, sum skal hjálpa barninum aftur á eina mennandi lívsleið, sum er merkt av trivnaði.

# 2. Átøkini í tilmælinum

## 2.1 Kostnaður og tíðarætlan

| Átak | 2023/24 | 2024/25 | 2025/26 | Kostnaður | ábyrgd | síða |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fleiri hendur** | | | | | | |
| **Átak nr. 1**<br>Co-teaching – 3 ára royndarverkætlan<br>(lag 1) | 2,5-2,6 mió. | 2,5-2,6 mió. | 2,5-2,6 mió. | 7,5-8 mió. kr. | BUMR | 32 |
| **Átak nr. 2**<br>Tvílæraraskipanin útbyggjast<br>(lag 1) | 18-20 mió. | 18-20 mió. | 18-20 mió. | partur av kostnaðinum kann møguliga fíggjast við umraðfestingum | BUMR | 33 |
| **Betri karmar** | | | | | | |
| **Átak nr. 3**<br>Skifti – samanhangandi skipan frá dagstovni til miðnám<br>(lag 1) | raðfesting | raðfesting | raðfesting | verandi starvsfólkaorka | BUMR / KF | 35 |
| **Átak nr. 4**<br>Markamót<br>4.1 millum geirar<br>4.2 í skúlunum<br>(lag 2) | raðfesting | raðfesting | raðfesting | verandi starvsfólkaorka | 4.1 BUMR/ HMR<br>4.2 BUMR | 36 |
| **Átak nr. 5**<br>Skúlafrávera: – 3 ára granskingarverkætlan<br>(lag 3) | 1,2 mió. | 1,2 mió. | 1,2 mió. | harav partur verður søkt frá granskingargrunnum | BUMR | 38 |
| **Skjótari hjálp** | | | | | | |
| **Átak nr. 6**<br>Lívsmeistran sum lærugrein<br>(lag 1) | 100 tús. | 100 tús. | 150 tús. | 350 tús. | BUMR | 39 |
| **Átak nr. 7**<br>Serfrøðin tættari knýtt at skúlanum/ barninum<br>(lag 2) | * | * | * | | BUMR | 40 |
| **Átak nr. 8.**<br>Eftirútbúgving og menning av (ser) námsfrøði í almennu fólkaskúlaskipanini<br>(lag 2) | | 3 mió. kr. | 3 mió. kr. | 6 mió. kr. | BUMR | 41 |
| **Átak nr. 9**<br>At samskipa og uppraðfesta psykoedukatión til barnið/tann unga og foreldur teirra aftaná, at barnið hevur fingið staðfest psykiatriska diagnosu<br>(lag 3) | 1 mió. kr. AMR<br>1 mió. kr. HMR | 1 mió. kr. AMR<br>1 mió. kr. HMR | 1mió. kr. HMR | 3-4 mió. kr. AMR og HMR | AMR/ HMR | 43 |

**** Til ber ikki hjá bólkinum at siga neyvt hvør tørvurin er, treyta av tillagingunum***

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur ábyrgd av at stig verða tikin til at fylgja upp upp á tilmælini, og at ein eftirmeting verður gjørd um 3 ár.

# 3. Inngangur

Seinastu árini hevur alsamt størri fokus verið á, at avbjóðingar eru í skipanum og kring skipanir, sum skulu samskipa sítt virksemi, soleiðis at børn og ung í truplum umstøðum verða stuðlað og hjálpt. Í hesum sambandi setti landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og mentamálum (í dag nevnt Barna- og útbúgvingarmálaráðið) henda arbeiðsbólk at nágreina og vísa á átøk á fólkaskúlaøkinum, sum kunnu økja um sannlíkindi fyri, at avvarðandi skipanir yvirum geirar megna at samskipa sítt virksemi, so at børn við sálarligum og sosialum avbjóðingum trívast, mennast og læra í fólkaskúlanum.

Sambært § 2 í fólkaskúlalógini er endamálið við fólkaskúlanum m.a. at:

> *„næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.*
>
> *Stk. 2. Fólkaskúlin eigur at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúp-hugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.*
>
> *Og sambært stk. 3 at „ …búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.“*

Tað at ganga í skúla, mennast, læra og at vera partur av einum felagsskapi í skúlanum er ein rættur, sum øll børn eiga. Hesin rættur er m.a. staðfestur í Barnarættindasáttmálanum, ST-sáttmálanum um rættindi hjá teimum, ið bera brek og annars í lóggávu og øðrum skjølum um fólkaskúlan og innan barna- og ungdómsøkið annars.

Hóast hesar málsetningar, hugsjónir og ynskir um ein fólkaskúla, sum bæði rúmar, inkluderar og skapar karmar um góða og mennandi læring og trivnað fyri øll børn, so eru avbjóðingar.

Síðstu árini tykist talið á børnum og ungum, ið ikki koma í skúla, at verða vaksið nógv. Talið av næmingum sum ganga í serstøkum sernámsfrøðiligum skúlaskipanum og serstovum er eisini økt munandi seinastu árini. Skúlaleiðarar og lærarar hava víst á, at eitthvørt má gerast fyri at hjálpa hesum næmingum. Í almenna rúminum hava vit javnan hoyrt um langa bíðitíðina at sleppa til útgreiningar hjá psykiatriska deplinum, um langa bíðilistan til at fáa ókeypis sálarfrøðiliga hjálp og um atfinningar at ymsum skipanum tvørtur um geirar, sum ikki samstarva nóg væl, og ikki í nóg stóran mun veita ta tænastu, sum verður eftirspurd.

Tørvur er á, at fyriskipanir og átøk verða sett í verk og samskipað á slíkan hátt, so forðast kann fyri, at børn mistrívast ella detta niðurímillum í verandi skipanum bæði innanfyri og uttanfyri skúlaverkið.

Í stuttum kann sigast, at alt fleiri serskúlaskipanir eru settar í verk, og hetta er ein leið, sum vit í arbeiðsbólkinum halda eigur at verða umhugsað. Vísandi til endamálsorðing fólkaskúlans og regluverk annars er staðfest, at vit eiga at miða ímóti at hava ein rúmligan fólkaskúla. Hóast ásannandi, at alt fleiri børn eru, sum ikki rúmast í vanliga fólkaskúlanum.

- Hví man tað vera?
- Er hetta vegna rák í samfelagnum sum t.d. avrikstrýst, individualisering og psykologisering?
- Hvat er tað við okkara skipanum, sum ger, at tað eru børn, sum ikki trívast og mennast í vanliga fólkaskúlanum?
- Hvussu kunnu skipanir og tey starvsfólk, ið starvast har, vera við til at menna fólkaskúlan og fólkaskúlaskipanina soleiðis, at hon kann verða eitt mennandi og lærandi stað fyri øll børn óansæð avbjóðingar?
- Hvussu fáa vit skipað ein skúla, har børn trívast,

mennast og fáa ta hóskandi hjálp teimum tørvar, og har skipanir, sum skulu stuðla barninum, samstarva um hetta endamál?

Bæði í Føroyum og londunum rundan um okkum hevur politiska skipanin roynt at seta ymiskar skipanir í verk fyri at royna at betra um sálarheilsuna og trivnaðin hjá børnum og ungum. Men talið av ungum og børnum, sum mistrívast, tykist tó halda áfram at vaksa.

- Er tíðin møguliga komin til at umhugsa, um vit hava ov stórt fokus á diagnosur, neyð og mistrivnað og á tær skipanir, sum skulu útgreina, viðgera og bøtu um?
- Eiga vit í almenna kjakinum heldur seta sjóneykuna á almenn námsfrøðilig og didaktisk atlit, har vit hava eitt nøktandi tal av kompetentum lærarum, sum vit hava álit á bæði kunnu makta og megna at taka á seg ábyrgdina og uppgávuna at møta og menna okkara børn?

Hetta merkir ikki, at vit skulu avnokta, hylja ella dylja mistrivnað, men møguliga kunnu vit fremja trivnað, læring, menning og sálarheilsu við at hava størri fokus á, hvussu vit kunnu skapa ein vælvirkandi skúla við nøktandi lærarakreftum, læraraførleikum og góðum kørmum at gagnnýta hesar førleikar og kreftir.

Hetta sæst aftur í okkara tilmæli, og eitt ítøkiligt dømi um hetta er, at vit ikki hava valt at hava eitt átak sum ***Lættari viðgerðartilboð*** við í okkara tilmæli, hóast vit eru tilvitað um, at tað av summum er eitt ynski um at fáa lættari viðgerðartilboð. Arbeiðsbólkurin ásannar, at hetta er viðkomandi og manglar, men vit mæla ikki til at hava viðgerð av einstøkum børnum inni í skúlanum. Hinvegin hava vit í tilmælinum eitt átak um at knýta serfrøðina tættari at næminginum og skúlanum, har endamálið er at seta inn tíðliga við skjótari hjálp, og harvið fyribyrgja, at 'glóðir gerast til størri eld'.



# 4. Arbeiðssetningur

Arbeiðið hjá bólkinum byggir á undanfarna arbeiðið á økinum[1]. Uppgávan er at nágreina trupulleikar og at finna loysnir og átøk á fólkaskúlaøkinum.

***Arbeiðssetningurin er at koma við ítøkiligum boðum upp á átøk, sum kunnu økja um sannlíkindini fyri, at avvarðandi skipanir megna at skipa so fyri, at børn við sálarligum og sosialum avbjóðingum trívast, mennast og læra í fólkaskúlanum.***

- At nágreina málbólkin
- At lýsa verandi skipanir, sum stimbra og stuðla uppundir, at næmingar trívast og megna at luttaka í undirvísingini í fólkaskúlanum
- At lýsa snávingarsteinar ella forðingar í skipanum, sum elva til, at børn og ung í hesum málbólki ikki luttaka í undirvísingini ella fáa eitt fólkaskúlaprógv
- At gera ítøkilig uppskot um, hvar skal setast inn fyri at tryggja, at næmingarnir verða hjálptir
- At lýsa, um tørvur er á nýggjum tilboðum, og hvørji hesi kundu verið

Upprunaliga varð ætlanin, at ein partur av samlaða arbeiðssetninginum skuldi verða: *„At meta um, hvørji átøk kunnu gerast innan fólkaskúlan, til tess at styrkja og menna talgildisførleikarnar hjá næmingum (sum til dømis talgildisbúgving), soleiðis at talgildismiðlar og -tól, umframt læring eisini stimbra trivnað og heilsu.“*

Arbeiðsbólkurin hevur valt ikki at viðgera hetta evnið nærri í hesum tilmælinum, tí vit meta, at hesin spurningur fellur eitt sindur uttan fyri tað, vit hava viðgjørt og kjakast um, harumframt er hetta ein so mikið stórur spurningur, sum krevur eina holla viðgerð. Bólkurin mælir tí til, at hesin spurningur verður viðgjørdur í einum øðrum høpi.



# 5. Um tilmælið

Í februar 2022 setti landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og mentamálum (nú Barna- og útbúgvingarmálaráðið), Jenis av Rana, ein arbeiðsbólk at koma við tilmælum um átøk, sum kunnu økja um sannlíkindi fyri, at avvarðandi skipanir yvirum geirar megna at samskipa sítt virksemi, so at børn við sálarligum og sosialum avbjóðingum trívast, mennast og læra í fólkaskúlanum. Hetta tilmælið skal lýsa verandi skipanir á skúla, heilsu- og almannaøkinum, sum skulu stuðla og stimbra børnini í teirra menning. Gerast skulu nøkur ítøkilig uppskot til, hvar setast kann inn í verandi skipanum fyri at tryggja, at børnini verða hjálpt á munabestan hátt, eins og mett verður um, hvørt tørvur er á nýggjum tilboðum ella átøkum. Hetta tilmæli fevnir sostatt bæði um at bøta um verandi skipanir, møgulig nýggj tilboð og ein tilgongd at samskipa skipanirnar innan allar geirar.

Tey, ið manna arbeiðsbólkin, eru:

- Almannamálaráðið (nú Almanna- og mentamálaráðið): Símun J. Hansen, fulltrúi
- Almannaverkið: Leif Olsen, fulltrúi
- Heilsumálaráðið: Guðrun Maria Mortensen, fulltrúi
- Barna- og ungdómspsykiatriin: Rókur av Fløtum Jespersen, sálarfrøðingur
- Undirvísingarstýrið: Magnus Tausen, fulltrúi
- Føroya Lærarafelag: Fríðbjørg Hammer, varaskúlastjóri og serlærari
- Nám: Tóra Petersen, trivnaðarráðgevi
- Sernám: Margreth Olsen, stjóri
- Námsvísindadeildin: Frida Poulsen, Ph.d lesandi
- Gigni: Sólrun Foldbo, fakligur stjóri
- Uttanríkis- og mentamálaráðið (nú Barna- og útbúgvingarmálaráðið): Høgni V. Warberg, skrivari, og Joan Knudsen, forkvinna, bæði eru fulltrúar

Arbeiðsbólkurin er breitt samansettur og umboðar ymisk fak- og virkisøki, umframt avvarðandi stjórnarráð UMMR (BÚMR), (AMR) og HMR. Tað hevur verið arbeitt við at finna eitt felags stev og eina felags fatan av, hvat hevur størsta týdning at fáa gjørt nakað við, og hvat er møguligt og realistiskt at fáa sett í verk. Bólkurin hevur verið ógvuliga tilvitaður og lagt áherðslu á, ikki at koma við tilmælum, sum mann ikki metir kunnu setast í verk innan rímiliga tíð. Arbeiðsbólkurin fór til verka í februar mánað, har arbeiðsskrá, fundartíðir og arbeiðssetningur vóru skipað. Í alt hevur bólkurin havt 16 fundir, har innihald, niðurstøður og tilmæli til átøk í hesum tilmæli eru gjørd.

# Stuðuls- og trivnaðarskipanir




**1**
Mannagongdir, átøk og tiltøk, sum liggja til grund fyri, at einstaki skúlin virkar væl í gerandisdegnum, og sum skal vera við til at fremja tað vit ynskja fyri barnið, bæði í mun til menning, læring og trivnað. Hetta kann til dømis vera grundleggjandi førleikar hjá starvsfólkum, vitan teirra um menning og trivnað hjá børnum, og at skúlin er væl skipaður í mun til uppgávur, leiklut og ábyrgd. Talan kann eisini verða um greiðar innanhýsis mannagongdir, skúlamentan, virðisgrundarlag, trivnaðarætlanir, foreldrasamstarv, samrøður og kanningar hjá heilsufrøðingi, royndir, lesiátøk, rokniátøk o.s.fr.

**2**
Mannagongdir, átøk og tiltøk, sum verða sett í verk, tá okkurt serstakt hendir; hetta kann til dømis vera tilbúgvingarætlan, ráðgeving frá serkønum, ráðgeving frá Sernámi og Námi, frá heilsufrøðingi o.s.fr.

**3**
Mannagongdir, átøk og tiltøk, sum verða sett í verk, tá tørvur er á meira enn tað, sum verður sett inn við í lag 2. Hetta kann til dømis verða, tá tørvur er á heima- og sjúkraundirvísing, sertilboðum, psykiatriskari viðgerð og útgreining, barnaverndartænastu, almannahjálp, o.s.fr.

Multi-tiered systems of support (Kearney C.A., 2021)

Hetta tilmæli tekur støði í ávísum hátti at lýsa hvørjar uppgávur og stuðulsskipanir eru í skúlanum, og í hesum sambandi ber til at býta hesar í trý yvirskipað løg

Í *lag 1* eru tær mannagongdir, átøk og tiltøk, sum liggja til grund fyri, at einstaki skúlin virkar væl í gerandisdegnum, og sum skal vera við til at fremja tað vit ynskja fyri barnið, bæði í mun til menning, læring og trivnað. Hetta kann til dømis vera grundleggjandi førleikar hjá starvsfólkum, vitan teirra um menning og trivnað hjá børnum, og at skúlin er væl skipaður í mun til uppgávur, leiklut og ábyrgd. Talan kann eisini verða um greiðar innanhýsis mannagongdir, skúlamentan, virðisgrundarlag, trivnaðarætlanir, foreldrasamstarv, samrøður og kanningar hjá heilsufrøðingi, royndir, lesiátøk, rokniátøk o.s.fr.

*Lag 2* eru tær mannagongdir, átøk og tiltøk, sum verða sett í verk, tá okkurt serstakt hendir; hetta kann til dømis vera tilbúgvingarætlan, ráðgeving frá serkønum, ráðgeving frá Sernámi og Námi, frá heilsufrøðingi o.s.fr.

*Lag 3* eru tær mannagongdir, átøk og tiltøk, sum verða sett í verk, tá tørvur er á meira enn tað, sum verður sett inn við í lag 2. Hetta kann til dømis verða, tá tørvur er á heima- og sjúkraundirvísing, sertilboðum, psykiatriskari viðgerð og útgreining, barnaverndartænastu, almannahjálp, o.s.fr.

Lag 1 fevnir um áhaldandi átøk og mannagongdir, sum eru heilsu- og trivnaðarfremjandi, og sum leiða til læring, trivnað og menning, og sum eru við til at fyribyrgja, at barnið ikki fær brúkt sínar førleikar ella fer at mistrívast. Lag 2 og 3 eru tiltøk og mannagongdir, sum verða aktiverað, tá talan er um interventión og rehabilitering, sum skal hjálpa barninum aftur á eina mennandi lívsleið, sum er merkt av trivnaði.

Í hesum tilmæli hava vit barnið í miðdeplinum, har barnarøddin verður hoyrd, og har barnið mennist, trívist og lærir. Skúlin skal kunna skapa góðar karmar fyri nútímans børn og foreldur, og tær ymsu skipanirnar rundan um skúlan skulu kunna verða við til at stuðla uppundir, at barnið mennist, trívist og lærir. Átøkini at røkka nærri hesum endamáli snúgva seg um hugtøkini fleiri hendur, betri karmar og skjótari hjálp.

Hetta tilmæli er býtt upp í tríggjar partar. Í fyrsta parti verður greitt frá, hvussu hugtakið børn í avbjóðandi umstøðum verður fatað í hesum tilmælinum, og hvørji børn talan er um (kap. 6). Annar partur lýsir, hvørjar skipanir talan er um í hesum tilmælinum (kap. 7). Triði partur snýr seg um forðingar, avbjóðingar ella snávingarsteinar í teimum ymsu skipanum, og hvørji átøk kunnu setast í verk til tess at minka um sannlíkindini fyri marginalisering av børnum, umframt átøk, sum eru við til at menna menningina, trivnaðin og sálarligu heilsuna hjá øllum børnum, sum eru partar av fólkaskúlanum (kap. 8).

# 6. At nágreina málbólkin

Í sambandi við fyrsta spurningin í arbeiðssetningin-um um at nágreina málbólkin børn við sálarligum og sosialum avbjóðingum, so hevur arbeiðsbólkurin bæði hugt eftir lógarverkinum fyri fólkaskúlan, teimum tølum vit hava innan føroyska fólkaskúlan, og eftir altjóða allýsingum í gransking og altjóða stovnum.

Yvirskipað hevur arbeiðsbólkurin tikið støði í tí áskoðan, at børn og ung grundleggjandi eiga at skiljast sum verandi áhugað í at læra og mennast saman við øðrum, og sum útgangsstøði eru áhugað í at vera partur av einum lærandi felagsskapi (UVM, 2014). Heldur enn at útnevna nakrar málbólkar av næmingum, sum verandi ómøguligar at inkludera í samlaða lærandi felagsskapin, eigur skúlin í størst møguligan mun at skapa møguleikar og karmar til at kveikja øll børn til at luttaka í undirvísingini (UVM, 2014). Hetta samsvarar við grein 42 í Fólka-skúlalógini: „*Eitt og hvørt undirvísingarskyldugt barn hevur skyldu at ganga í fólkaskúlan, um tað ikki á annan hátt fær eina undirvísing, ið kann javnmetast við ta, sum vanliga verður kravd í fólkaskúlanum.*“ Og hetta er somuleiðis í tráð við grein 28 í barnarætt-indasáttmálanum hjá sameindu tjóðum: „*gera tiltøk fyri at eggja til, at gingið verður regluliga í skúla, og at so fá sum gjørligt falla frá* „ (Kunngerð, 1992).

Sambært altjóða felagsskapinum fyri samstarvi og menning, Organization for Economic Co-operation and Development (OECD, 2007) hevur allýsingin av málbólkinum flutt seg frá at hava brúkt heiti sum „børn og ung við serligum tørvi ella serligum avbjóðingum“ til at tosa um, at øll børn kunnu vera í vanda fyri at verða marginaliserað ella útihýst“(ibid.). Felagsskapurin vísir á tríggjar bólkar av næmingum, sum eru í vanda fyri marginalisering ella útihýsan, og at hesi kunnu vera vegna:

1. brek ella avlamni (disabilities), har børnini hava tørv á serligum fyriskipanum ella stuðli.
2. trupulleikar (difficulties), sum vísa til atferðar-truplar ella kensluligar avbjóðingar og
3. meinbogar (disadvantages) fyrst og fremst vegna sosioøkonomiskar, mentanarligar ella málsligar faktorar (OECD, 2007, s. 20).

Soleiðis kunnu flest allir næmingar í føroyska fólka-skúlanum eitt ella annað tíðarskeið í skúlatíðini koma soleiðis fyri, at tey stríðast við ymiskar avbjóð-ingar innan ávísan bólk lýst omanfyri.

Týdningarmikið er at hava í huga, at málbólkurin er broytiligur. Ein næmingur kann eina tíð mennast og trívast í skúlanum uttan serstøk tiltøk ella átøk, fyri síðan at koma í eina støðu, sum ger, at tørvur er á serligum tiltøkum í eina tíð. Hinvegin kann støðan eisini vera tann, at ein næmingur vegna eina av orsøkunum, ið OECD hevur allýst, frá skúlabyrjan tørvar serlig tiltøk antin restina av skúlatíðini ella í eina tíð, fyri at kunna virka, trívast og mennast.

Gransking í mótstøðuføri hevur m.a. til endamáls at kanna, hvørjir verjandi og hóttandi faktorar ávika-vist kunnu minka ella økja um møguleikan fyri, at børn læra, mennast og trívast, eisini tá tey vaksa til (Werner & Smith, 1977; Sommer, 2011).

Úrslitini frá hesi gransking hava m.a. gjørt, at mann eru farin frá at skilja menningina hjá barninum sum eina eintáttaða gongd, sum bert tekur støði í faktorum knýtt at tí einstaka menniskjanum og tess risiko- ella mótstøðuføri, til at skilja hesa gongd, sum eina relationella, kompleksa og dynamiska gongd, har viðurskifti, umstøður og skipanir ávirka hvørt annað (Sommer, 2011). Um vit í ov stóran mun fata orsakirnar til trupulleikarnar hjá barninum sum verandi individuellar og sálarligar, so er vandi fyri, at vit økja um barnsins sjálvkritik, trýst og krøv, sum kunnu føra við sær mistrivnað, tá barnið ikki følir seg liva upp til sínar egnu, skúlans og samfelagsins væntanir. Í hesum meldri av einstaklingum, bólk-um, normum, virðum, áskoðanum, siðvenjum og mentanum finnast bæði verjandi og hóttandi fakt-orar, ið ávirka barnsins relatión til seg sjálvan, sínar floksfelagar, sínar lærarar o.s.fr.



Samanumtikið verður málbólkurin soleiðis allýstur sum teir næmingar, ið frá tíð til aðra ella varandi, hava tørv á serligum tiltøkum ella ***avvarðandi skipanum til at stuðla teimum í teirra læring, menning og trivnaði.***

# 7. Verandi skipanir

Fyrst og fremst er fólkaskúlin ein kompleks skipan í sjálvum sær; fólkaskúlin er samansettur av fleiri partskipanum inni í skipanini, umframt at fólkaskúlin samstarvar við nógvar skipanir, sum eru í sama geira og frá øðrum geirum.

# 7.1. Skipanir innan skúlaverkið

Í skúlaskipanini eru fleiri skipanir, sum eru ætlaðar at stuðla undir trivnaðin og læringina hjá neminginum.



### 7.1.1 INKLUSIÓN SUM GRUNDLEGGJANDI VISIÓN

Hví menna eina inkluderandi skúlaskipan? Almennu Føroyar hava tikið nøkur avgerandi stig á leiðini at taka til sín og menna altjóða politisku visjónina um ein inkluderandi skúla (Poulsen, 2020, 2021).

Føroyar skrivaðu í 2009 undir ST sáttmálan um rættindi hjá teimum, ið bera brek. Hetta merkir m.a., at Føroyar hava bundið seg til at arbeiða fyri einum inkluderandi skúla. Eisini hava vit bundið okkum til Barnarættindasáttmálan, sum vísir á eina inkluderandi kós. Í fleiri almennum skúlapolitiskum skjølum er skrivað, at skúlaverkið skal arbeiða inkluderandi. Hesin málsetningur um ein inkluderandi skúla er m.a. staðfestur í tilmælum til Mentamálaráðið um sernámsfrøði frá 2011 og 2014, í uppriti um Førleikastovur frá 2012, og í kunngerð frá 2019 um Førleikastovur og í kunngerð um serundirvísing, sernámsfrøðiligan tørv og sernámsfrøðiligan stuðul frá 2018 (Poulsen, 2020).

Hvat er so ein inkluderandi skúli? Inklusjón snýr seg um luttøku, úrtøku og viðurkenning av øllum næmingum skúlans (Farrell, 2002). Farrell nevnir fýra punkt, sum skulu vera til staðar fyri at talan kann verða um inklusjón í skúlahøpi. Fyri tað fyrsta skal næmingurin vera til staðar, sum tað næsta skal næmingurin kunna vera virkin og taka lut í felagsskapinum, sum tað triðja skal næmingurin kunna mennast, har hann er, og sum tað fjórða skal næmingurin verða ynsktur, góðtikin og viðurkendur av skúlanum, sum ein virðismikil luttakari. Um skúlin skal kunna vera eyðmerktur sum ein inkluderandi skúli, so eigur hann at bjóða øllum næmingum vælkomnum sum heilir og virknir luttakarar í skúlafelagsskapinum, har rúm er fyri menning og læring (Farrell, 2002). Sambært hesi fatan av inklusjón, verður fjølbroytni bjóðað vælkomið í skúlanum og sæð sum eitt ríkidømi fyri skúlaumhvørvið.

Við støði í føroyskum politiskum ætlanum um at menna tann inkluderandi skúlan í Føroyum, eru her nøkur orð um, hvussu tann inkluderandi skúlin verður fataður sambært altjóða viðtøkum. Dentur verður lagdur á, at inkluderandi skúlin ikki er eitt nýtt heiti fyri sernámsfrøði ella virksemi, sum er ætlað ávísum bólkum av næmingum. Heldur hinvegin royna inkluderandi skúlar í størstan mun at sleppa sær av við heitið so sum „næmingar við serligum tørvi“, tí henda einstaklingseyðmerking hevur fokus á trupulleikar og avbjóðingar hjá tí einstaka. Í inklusiónsmáli verður heldur tosað um forðingar í mun til lærdóm og luttøku. Forðingar kunnu vera allastaðni í skipanini, t.d. í skúlanum, í stuðulsskipanum, í samfelagnum, í galdandi skúlalóggávu o.s.fr. Forðingar kunnu gera seg galdandi fyri allar næmingar. Konteksturin ella støðan barnið er í, er ofta avgerandi fyri, um tarnið hjá barninum er ein forðing ella ikki. Tað, sum er ein forðing í einum konteksti, nýtist als ikki hava eina neiliga ávirkan í aðrari støðu. Ein orðblindur kann t.d. als ongar forðingar hava, um hann hevur røttu amboðini og dugir at brúka tey, ella í lærugreinini svimjing nýtist als ikki verða talan um nakað tarn hjá næminginum við orðblindni. Somuleiðis tá talan er um eitt barn við sálarligum/sosialum avbjóðingum. Fær barnið ein hóskandi stuðul í kontekstinum, nýtast sálarligu avbjóðingarnar ikki at gerast ein forðing í mun til barnsins menning og trivnað. Um fokus bert er á næmingar við serligum tørvi, kunnu vit hava torført við at síggja aðrar trupulleikar, avbjóðingar og avmarkingar, sum aðrir bólkar av næmingum kenna. Fatanin av, at forðingar fyri læring og trivnaði serliga eru knýttar at einstaka barninum, kann gera tað trupult at fáa eyga á aðrar umstøður, ið kunnu avmarka luttøku og læring sum t.d. arbeiðshættir, skipanir, innihald, skúlamentan, karmar o.s.fr.

Yvirskipað kann mann siga, at arbeiðið við at menna inklusión í skúlahøpi hevur tvey høvuðsendamál:

- At eyðmerkja og minka um forðingar fyri luttøku, læring, menning og trivnaði.
- At økja um stuðulin til luttøku í læringshøpi og læringsumhvørvi fyri at fáa best møguligu úrtøku og úrslit.

Ein inkluderandi skúli er allatíðina í menning og broyting fyri at kunna møta og menna fjølbroytta næmingahópin, sum til eina og hvørja tíð er partur av gerandisdegnum í skúlanum. Eitt lyklaorð í hesum sambandi er læring rættað til hetta fjølbroytni.

### 7.1.2 SKIPANIR

Skúlaárið 2021/22 vóru 41 fólkaskúlar, 3 frískúlar og 1 serskúli í Føroyum. Hetta skúlaárið gingu 6.943 næmingar í føroysku fólkaskúlunum íroknað serskúlanum, og í fríksúlunum gingu 179 næmingar. Samlaða játtanin til almenna fólkaskúlan var fíggjarárið 2021 402 mió. kr.

Samlaða játtanin á fíggjarlógini fíggjarárið 2021 til fólkaskúlan, Skúlan á Trøðni og Sernám var 440 mió. kr.

Í 2021 var samlaða útreiðslan til serøkið í fólkaskúlanum 125 mió. kr. býtt soleiðis:

- Miðfirrað tímajáttan: 36 mió. kr.
- Námsfrøðiligir stuðlar í fólkaskúlanum: 10 mió. kr.
- Førleikastovan: 9 mió. kr.
- Serflokkar: 32 mió. kr.
- Skúlin á Trøðni: 16,4 mió. kr.
- Sernám 21,5 mió. kr.

Samanlagt varð brúkt á serøkinum 125 mió. kr., og svarar hetta til góð 28% av av samlaðu játtanini á 440 mió. kr. Tó skal viðmerkjast, at ikki alt arbeiði hjá førleikastovuni er tilætlað serøkinum.

Í hesi uppgerðini er stuðulin hjá landinum til fríksúlar bæði til vanligt virksemi og sernámsfrøðilig átøk ikki tikin við. Stuðulin til fríksúlar var í 2021 9 mió. kr. umframt serstaka játtan til sernámsfrøðilig átøk áljóðandi 1,4 mió. kr. Samlaði almenni stuðulin var í 2021 tískil 10,4 mió. kr.

Tað er serliga játtanin til serflokkarnar, sum er hækkað tey seinastu árini, uttan at samlaða játtanin til fólkaskúlaøkið er hækkað samsvarandi. Innanhýsis tillagingar, næmingaflytingar millum skúlar og minni serlig játtan til einstakar næmingar, sum nú eru visiteraðir til serflokkar, eru viðvirkandi til hetta.



## Flokslærarin og flokstoymið

Í Ll. nr. 125 frá 20. juni í 1997 við seinni broytingum verður ásett í § 21, stk.5: *„Til hvønn flokk verður settur ein flokslærari at loysa serstakar uppgávur flokkinum viðvíkjandi“*. Uppgávan hjá flokslæraranum verður nærri lýst í kunngerð nr. 37 frá 26. mars 2006. Í somu grein eru orðingar um toymini kring flokkin: *Stk. 2. „Tað áliggur leiðslu skúlans at tryggja, at flokslærarin og aðrir lærarar floksins ráðleggja og fyrireika undirvísingina, so at allir næmingar kunnu fáa sínar avbjóðingar“*.

Flokslærarin hevur ein avgerandi leiklut í arbeiðinum at stuðla undir, at næmingurin áhaldandi kann mennast inni í felagsskapinum, og at næmingurin kann kenna seg sum ein virknan luttakara, sum kann geva sítt íkast til felagsskapin. Flokslærarin er krummtappurin, tá ið talan er um at fáa børnini at trívast í flokkinum, felagsskapinum og í skúlanum sum heild. Í síni virksemisætlan fær flokslærarin 3 tímar (1. flokkur 4 tímar) til hvønn næming, t.v.s. flokslærari hjá flokki við 20 næmingum fær 60 klokkutímar um árið av í alt 1800 tímum til hesa uppgávu. Parturin av játtanini til flokslærarauppgávuna er umleið 6 mió. kr. árliga. Hvør flokkur hevur eitt flokstoymi av lærarum, sum hava ábyrgd av fakligu gongdini og trivnaðinum hjá hvørjum einstøkum næmingi og hjá flokkinum. Lærararnir og námsfrøðingarnir í flokstoymunum eiga sum heild at leggja stóran dent á trivnað, eisini tí trivnaður er ein fortreyt fyri læring. Í hóskandi mun skulu trivnaðartiltøk, átøk og øðrvísi áhugaverdir skúladagar fyriskipast.

## Førleikastovur

Í Ll. nr. 125 frá 20. juni í 1997 við seinni broytingum verður í § 24 stk. 3 ásett:

> *„Førleikastovur verða skipaðar at samskipa arbeiðið hjá serlærarum, lesivegleiðarum, akt-lærarum, støddfrøðivegleiðarum og øðrum starvsfólkum við serútbúgving, sum veita námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving og undirvísing.“*

Nærri reglur um førleikastovurnar eru ásettar í kunngerð nr. 95 frá 2. juli 2019.

Endamálið við førleikastovunum er at samskipa og styrkja námsfrøðiligu og fakligu førleikarnar í skúlunum og miða ímóti, at næmingarnir fáa neyðuga hjálp so tíðliga sum gjørligt. Førleikastovan samskipar saman við skúlaleiðsluni serundirvísingina og sernámsfrøðiliga stuðulin. Førleikastovan hevur nógv fakfólk knýtt at sær og skal kunna veita skjóta og góða hjálp, vegleiðing og ráðgeving. Limir í førleikastovuni eru: serlærari, AKT (Atferð, Kontakt og Trivnaður), lesivegleiðari, støddfrøðivegleiðari og orðblindalærari. Onnur kunnu verða knýtt at førleikastovuni eftir tørvi, tað veri seg SSP, heilsufrøðingur, flokslærari, lestrarvegleiðari og KT-umboð.

Førleikastovan hevur tætt samband við flokslærarar og flokstoymi, umframt samband við útsettar næmingar. Hetta gevur møguleikar at síggja mistrivnað hjá næmingunum, og samstundis verða viðvirkandi til, at næmingarnir megna at verða inkluderaðir í egnum flokki. Arbeiðsøki hjá AKT-lærarum er saman við starvsfólkum skúlans at fremja trivnað, fyribyrgja happing og tískil vera við til at varnast, um næmingar mistrívast. Barna- og útbúgvingarmálaráðið fyriskipar trivnaðarkanningar annaðhvørt ár. Trivnaðarráðgevin hjá Námi er ein aktivur partur hjá leiðslunum og førleikastouvunum til at greina og lýsa úrslitini hjá einstaka skúlanum í trivnaðarkanningini.

Játtanin til førleikastovurnar er umleið 9 mió. kr. árliga.

### Skúlaleiðslan

Skúlaleiðslan hevur evstu ábyrgd av virkseminum í tí einstaka skúlanum, eins og skúlaleiðarin hevur bæði fyrisitingarligu, fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna um hendi, har hann skal standa á odda fyri menning, virka fyri trivnaði og góðum samstarvi við atliti at næmingum, at teir fáa ávirkan og samábyrgd, at fremja gott samstarv millum skúla og heim, umframt eggja næmingum at taka lut í undirvísingini og fáa sum mest burturúr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt. Og í Ll. nr. 125 frá 20. juni í 1997 við seinni broytingum stendur í § 45 soleiðis: *„Leiðari skúlans ansar eftir, at allir teir næmingar, sum eru skrivaðir inn í fólkaskúlan, taka lut í undirvísingini, smb. § 55, 5. stk."*

Umframt støðugt at ganga á odda við at skapa góðar umstøður og karmar fyri trivnaði og læring, skal skúlaleiðarin eisini seta nøktandi tiltøk í verk, tá tekin eru um mistrivnað, happing og sosialar avbjóðingar í skúlanum, og hetta verður eisini staðfest í somu lóg í § 45, stk. 4: *„Skúlaleiðarin setur fyriskipan í verk fyri næmingar, ið hava serligar avbjóðingar, harímillum við atliti at sosialum felagsskapi, trivnaði og tilknýti. Stig kunnu verða tikin til, at næmingar verða fluttir í annan skúla ella í annað undirvísingartilboð."*

### Skúlastýrið

Skúlastýrið hevur eisini sín leiklut í mun til at virka fyri trivnaði í skúlanum. Umframt skúlaleiðaran, ið er fastur skrivari uttan atkvøðurætt í skúlastýrinum, eru læraraumboð, kommunuumboð og foreldraumboð eisini partur av skúlastýrinum. Hvørt einstakt skúlastýrið skal árliga í minsta lagi hava 6 fundir, og uppgávan hjá skúlastýrinum er sambært § 52 í Ll. nr. 125 frá 20. juni í 1997 við seinni broytingum at hava eftirlit við skúlanum, og sambært § 53 at áseta meginreglurnar um virksemi skúlans, herímillum meginreglurnar um: næmingafráveru og trivnaðarætlan skúlans. Somuleiðis stendur í Ll. nr. 125 frá 20. juni í 1997 við seinni broytingum *§ 53, Stk. 5: „Skúlastýrið ger við støði í ásettum reglum, smb. § 60, atferðarreglur skúlans og reglur um umsjónina við næmingunum í skúlatíðini"*,

Við hesum í huga kann eitt dygdargott samstarv í skúlastýrinum millum skúlaleiðaran, kommunuumboðini og foreldraumboðini veruliga gera mun og bera ávøkstur fyri einstaka skúlan, har trivnaðarætlan, virðisgrundarlag og skúlans skipaða virksemi verða viðgjørd og diskuterað á ein konstruktivan hátt.

### Miðfirraða játtanin

Í játtanarskipanini til fólkaskúlan er innroknað ein miðfirrað tímajáttan, sum er 24% av næmingatalinum. Hetta merkir, at 100 næmingar geva 24 undirvísingartímar um vikuna í miðfirraðari játtan. Endamálið við hesi játtan er lýst soleiðis: Miðfirraða tímajáttanin er ætlað til serundirvísing og onnur serundirvísingarlig átøk, sum t.d. lesiskeið, økta tvílæraraskipan, serligar undirvísingarligar tilgongdir o.s.fr. Tímar til miðfirraða serundirvísing eiga bert at nýtast til sernámsfrøðilig átøk. Hesir tímar skulu nýtast til stuðul og eykahjálp í einstøkum lærugreinum til næmingar ella næmingabólkar, sum hava ilt við at fylgja við vanligu undirvísingini í lærugreinini. Miðfirraða serundirvísingin eigur at verða ráðløgd saman við Førleikastovuni og við ráðgeving frá Sernámi.

Miðfirraða tímajáttanin er umleið 36 mió. kr. árliga.

### Námsfrøðiligir stuðlar í fólkaskúlanum

Afturat skipanini við miðfirraðu tímajáttanini, er ein onnur serstøk skipan í fólkaskúlanum í sambandi við tímar til námsfrøðiligar stuðlar. Henda skipan gongur ikki eftir fastari normering, so sum miðfirraða tímajáttanin ger. Skipanin er grundað á ítøkiligar metingar ár fyri ár, sum taka støði í ítøkiliga tørvinum í einstaka skúlanum. Tó hava fleiri av størru skúlunum nú eina fasta játtan hesum viðvíkjandi, grundað á ein varandi tørv í næmingahópinum. Tað hevur tí borið til at seta námsfrøðingar í fast starv í skúlunum, og soleiðis avmarkað ov nógva útskiftan av stuðlum, sum børnini so aftur skulu knýta seg til.

Játtanin til námsfrøðiligar stuðlar í fólkaskúlanum er umleið 10 mió. kr. í 2022.

### Garðvaktarskipanin

Í Ll. nr. 125 frá 20. juni í 1997 við seinni broytingum eru orðingar í § 60 um umsjón hjá skúlunum:



*Landsstýrismaðurin ger vanligar reglur um fyriskipanir til tess at fremja gott skil í skúlunum og um umsjón skúlanna við næmingunum í skúlatíðini.*

Við heimild í lógini er ásett í kunngerð nr. 68 frá 9 juni 2010: „*§ 1. Við støði í meginreglum ásettum í hesi kunngerð ger skúlastýrið reglur um fyriskipanir til at fremja gott skil í skúlanum, um umsjón við næmingunum í tímum, fríkorterum, matarsteðgi o. ø. og um trivnaðarætlan skúlans, serliga viðvíkjandi happing*".

Og víðari í § 3: „*Skyldan hjá skúlanum at hava umsjón við næmingunum, tá ið næmingarnir eru á skúlans øki, byrjar 10 minuttir, áðrenn undirvísingin byrjar og heldur uppat 10 minuttir eftir seinasta tíma hjá næminginum.*"

Hetta er ein liður í at skapa tryggleika og trivnað í skúlanum, og flestu skúlar hava útiøki við alskyns hentleikum, sparkivøllum, spæliplássum v.m. Fleiri skúlar hava skipað spæl í fríkorterunum við t.d. spæliliðnum, har eldru næmingar fyrireika og fyriskipa spøl fyri aðrar næmingabólkar. Í trivnaðarkanningunum í fólkaskúlanum er komið fram, at júst fríkorterið kann skapa støður, har børn kunnu verða fyri ágangi og tískil bæði mistrívast og fáa mein.

Arbeiðstíðaravtalan hjá lærarum er skipað soleiðis, at fyri hvønn undirvísingartíma á 45 minuttir verður roknað 10 minuttir fríkorter, sum lærarin fær løn fyri og tí skal vera tøkur.

Játtanin til garðvakt í fólkaskúlanum er umleið 24 mió. kr. árliga.

## 7.1.3 HÓSKANDI STUÐUL – SERLIGAR FYRISKIPANIR

Serundirvísing verður veitt næmingum, sum ikki fáa nøktandi úrtøku úr vanligu undirvísingini, og hetta kann bæði vera inni í flokkinum og uttanfyri. Talan kann verða um sernámsfrøðilig átøk í bólkum í eitt tíðarskeið innan ávís evni ella lærugrein, og sernámsfrøðiligur stuðul kann eisini verða veittur fyri at venja og stuðla uppundir læri- og menningartilgongdina hjá næminginum.

Miðað verður sum heild ímóti, at næmingurin verður inkluderaður í flokkinum, men børn, sum vegna sjúku, smittuvanda ella mistrivnað, ikki koma í skúla í eitt longri tíðarskeið, hava rætt til heima- og sjúkraundirvísing. Flokslærarin hevur ábyrgd av at kunna leiðsluna, soleiðis at stig kunnu takast til heima- og sjúkraundirvísing. Samlaða nýtslan til heima- og sjúkraundirvísing í 2022 við framskrivingum er umleið 3 mió. kr.

Næmingar við serligum tørvi hava sambært kunngerð nr. 15 frá 28. februar 2013 møguleika at fara til próvtøku eftir serligari fyriskipan. Allir næmingar í føroyska fólkaskúlanum skulu eftir loknan 9. flokk fáa antin prógv ella eitt støðumetingarskjal. Harumframt er eisini møguligt at fáa OCN prógv saman við støðumetingarskjalinum.

## SSP:

SSP-skipanin, ið er eitt tvørgeiraligt samstarv millum Skúla, Politi og Sosialar myndugleikar, hevur til endamáls at byggja upp, brúka og røkja fakligt netverk, sum hava eina mennandi ávirkan á gerandisdagin hjá børnum og ungum. Arbeitt verður í trimum stigum, alment, serstakt og einstaklinga. Tá SSP samstarvið upprunaliga var sett í verk, var høvuðsdentur lagdur á at fyribyrgja harðskap (kriminalitet) millum børn og ung. Við regluligum netverksfundum í teimum ymsu økjunum kring landið, kjakast ymisku fakfólkini um avbjóðingar, vandar og átøk í júst teirra økið. Endamálið er at skapa tryggar, áhugaverdar og mennandi umstøður, ið fáa tey ungu at frávelja rúsevnir, herverk, harðskap og í staðin velja gagnligt frítíðarvirksemi. Síðstu árini hevur SSP lagt stóra áherðslu á týdningin av góðum og tøttum foreldrasamstarvi, umframt undirvísing og vegleiðing í at nýta rættan atburð á netinum við talgildum fólkaskikki.

## Serskúli:

Serskúlin, Skúlin á Trøðni hevur verið virkin síðani 1962, tá ið skúlin byrjaði sum sokallaður „Deyvaskúli“, ið seinni bleiv til „Spesialskúli“og fekk navnið Skúlin á Trøðni. Skúlin virkar eftir løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 við seinni broytingum, og Serskúlin er til børn við serligum tørvi í aldrinum 7 til 18 ár úr øllum landinum. Í serligum førum ganga næmingarnir í skúlanum til teir eru 21 ár. Serskúlin er ætlaður teimum næmingum, sum ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum.

Játtanin til skúlan á Trøðni er fíggjarárið 2022 á leið 17,4 mió. kr.

## Serflokkar:

Í Ll. 125 frá 20. juni 1997 við seinni broytingum verður í § 45 ásett:

> *„Stk. 6. Landsstýrismanninum verður heimilað at seta á stovn serligan skúla ella undirvísingartilboð fyri næmingar, ið hava serligar avbjóðingar, harímillum við atliti at sosialum felagsskapi, trivnaði og tilknýti, ið ikki á annan hátt kunnu fáa nøktandi undirvísing í fólkaskúlanum.*
> *Stk. 7. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skúla ella undirvísingartilboð sbrt. stk. 6.“*

Við heimild í hesi áseting er kunngerð nr. 24 frá 19. mars 2019 lýst, og skipar hon økið nærri.

Í 2022 eru 10 serflokkar skipaðir runt um í landinum. Teir eru staðsettir: á Skúlatrøð, Vestmanna skúla, Sørvágs skúla, Tvøroyrar skúla, Vágs skúla, Skúlanum á Fløtum, Eysturskúlanum, Hoyvíkar skúla, Runavíkar kommunuskúla og Skúlanum við Streymin. Serflokkar eru undirvísingartilboð í fólkaskúlanum, har veitt verður serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og

## Sertilboð – kynsbýti og gongd

| | 2022/23 | | 2021/22 | | 2020/21 | | 2019/20 | | 2018/19 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Sertilboð** | **Dreingir** | **Gentur** | **Dreingir** | **Gentur** | **Dreingir** | **Gentur** | **Dreingir** | **Gentur** | **Dreingir** | **Gentur** |
| á Skúlatrøð | 38 | 18 | 28 | 14 | 24 | 10 | 27 | 11 | 20 | 9 |
| Eysturskúlin | 10 | | 9 | | 6 | | 3 | | | |
| Hoyvíkar skúli | 12 | 4 | 13 | 3 | 14 | 1 | 12 | 1 | 12 | 1 |
| Runavíkar kommuskúli | 14 | 11 | 12 | 8 | 12 | 6 | 6 | 5 | 14 | 4 |
| Skúlin á Fløtum (Guli) | 31 | 21 | 32 | 15 | 27 | 6 | 25 | 3 | 22 | 5 |
| Skúlin við Streymin | 11 | 1 | 17 | | 14 | | 14 | 1 | 10 | 1 |
| Sørvágs skúli | 9 | 3 | 8 | 4 | 6 | 6 | 5 | 3 | 5 | 4 |
| Tvøroyrar skúli | 9 | 6 | 9 | 2 | 6 | 1 | 6 | | 8 | |
| Vágs skúli | 12 | 2 | 13 | 1 | 14 | 2 | 11 | 3 | 9 | 2 |
| Vestmanna skúli | 5 | 3 | 6 | 2 | 5 | 1 | | | | |
| **Kynsbýti íalt** | **150** | **69** | **146** | **49** | **128** | **33** | **109** | **27** | **100** | **26** |
| **Næmingatal íalt** | **219** | | **195** | | **161** | | **136** | | **126** | |
| **%** | **68,5** | **31,5** | **74,9** | **25,1** | **79,5** | **20,5** | **80,1** | **19,9** | **79,4** | **20,6** |

## Heima- og sjúkraundirvísing – kynsbýti og gongd

| | 2022/23 | | 2021/22 | | 2020/21 | | 2019/20 | | 2018/19 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Aðrar fyriskipanir** | **Dreingir** | **Gentur** | **Dreingir** | **Gentur** | **Dreingir** | **Gentur** | **Dreingir** | **Gentur** | **Dreingir** | **Gentur** |
| Lopfjølin | 3 | 8 | 3 | 9 | 2 | 9 | 1 | 8 | 6 | 4 |
| Aðrar fyriskipanir | 13 | 21 | 12 | 28 | 33 | 8 | 25 | 6 | 11 | 19 |
| Dreingir/gentur | 16 | 29 | 15 | 37 | 35 | 17 | 26 | 14 | 17 | 23 |
| **Næmingatal íalt** | **45** | | **52** | | **52** | | **40** | | **40** | |
| **%** | **35,6** | **64,4** | **28,8** | **71,2** | **67,3** | **32,7** | **65,0** | **35,0** | **42,5** | **57,5** |

sernámsfrøðiligur stuðul. Málbólkurin eru næmingar, sum ikki fáa nøktandi tilboð í vanligu skúlaskipanini. Fyri at eitt barn kann koma í ein serflokk er tað ein treyt, at barnið fyrst er ávíst til upptøkubólkin, sum so tekur avgerð. Miðað verður ímóti, at næmingarnir taka 9. floks prógv ella 9. flokk við støðumetingarskjali sambært kunngerð um próvtøkur fólkaskúlans. Starvsfólkanormeringin í einum serflokki er 1:3.

Omanfyri síggja vit, at skúlaárið 2018/19 vóru í alt 8 sertilboð við tilsamans 126 næmingum. Hetta svarar til, at á leið 1,9 % av næmingunum vóru í serflokki. Skúlaárið 2022/23 eru 10 sertilboð við tilsamans 219 næmingum. Hetta svarar til á leið 3,1 % av næmingunum.

Í hesum tølunum telja næmingarnir í serskúlanum, Skúlanum á Trøðni (55 næmingar) og Lopfjølini (12 næmingar) ikki við. Skúlaárið 2022/23 eru á leið 4 % av næmingunum í føroyska fólkaskúlanum knýttir at eini serskipan uttan fyri vanliga fólkaskúlan, t,v,s. í serflokki, Lopfjøl ella serskúla.

| Næmingatøl í sertilboðum og skúlanum á Trøðni | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Stað** | **2018/19** | **2019/20** | **2020/21** | **2021/22** | **2022/23** |
| Sertilboð | 126 | 136 | 161 | 195 | 219 |
| Skúlin á Trøðni | 42 | 48 | 53 | 56 | 62 |
| **Í alt** | **168** | **184** | **214** | **251** | **281** |
| **% - vøkstur** | | **9,5** | **27,4** | **49,4** | **67,3** |
| **% uttanfyri vanliga fólkaskúlan** | **2,4** | **2,6** | **3,1** | **3,6** | **4,0** |

Sama tíðarskeið er játtanin til serflokkar farin úr 22,5 mio. kr. í 2019 upp í 32 mió. kr. í 2021. Framskrivingin fyri serflokkar fyri alt 2022 vísir 37 mió. kr.

Umframt hesa gongd við sertilboðum og øktum næmingatali í teimum, er skúlin á Trøðni eisini vaksin munandi í sama tíðarskeiði. Úr 42 næmingum skúlaárið 2018/19 til 56 næmingar skúlaárið 2021/22. Fyribilstølini fyri skúlaárið 2022/23 vísa, at væntandi vera 61 næmingar í Skúlanum á Trøðni.

## Lopfjølin

Lopfjølin í Havn er sprottin úr tankanum um at samskipa heima- og sjúkraundirvísingina í Tórshavnar kommunu. Talan er í høvuðsheitum um børn og ung, ið hava sálarligar avbjóðingar; ið hava havt nógva fráveru, og sum illa megna at møta í skúla, ella kenna ta vanligu skúlagongdina ov tunga ella ov møtismikla. Endamálið er at varðveita tilknýtið til heimaskúlan, so at næmingurin kemur aftur í skúlan. Lopfjølin er eitt sosialpedagogiskt skúlatilboð fyri næmingar við skúlaaftran í Tórshavnar kommunu. Tilboðið er úrslit av einum tvørfakligum samstarvi millum sosialu deild- og skúlamyndugleikarnar. Tilboðið er skipað sum eitt samstarv millum Barnaverndartænastuna, Sernám, Undirvísingarstýrið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið.

Játtanin til Lopfjølina er fíggjarárið 2022 umleið 1 mió. kr. til undirvísing, umframt játtan frá Tórshavnar kommunu.

## Sernám

Leikluturin hjá Sernámi er sbrt. § 4, stk. 5 í Fólkaskúlalógini: *„at veita skúlum, foreldrum og øðrum, ið varða av næminginum í fólkaskúlanum, sernámsfrøðiliga og sálarfrøðiliga ráðgeving“*.

Alt arbeiðið hjá Sernámi á fólkaskúlaøkinum er grundað á Fólkaskúlalógina, kunngerðum knýttar at Fólkaskúlalógini og serskúlalógini.

Við støði í lógum og kunngerðum, hevur Sernám orðað sína høvuðsuppgávu soleiðis:

> *„Sernám er ein landsumfatandi stovnur, sum arbeiðir við børnum og ungum í aldrinum 0-18 ár, ið tørva hjálp til menning, læring og trivnað.*
>
> *Grundað á servitan innan ergo- og fysioterapi, sálarfrøði, sernámsfrøði, sjón, talu og hoyrn verður samstarvað við starvsfólk á dagstovnum og skúlum og við foreldur/avvarðandi um at skapa felagsskapir, har børn kunnu trívast, læra og mennast.“*

Málbólkurin er børn og ung 0-18 ár, ið tørva hjálp til menning, læring og trivnað. Tey fáa hjálp frá Sernámi á tann hátt, at Sernám ráðgevur teimum vaksnu, sum eru um børnini til dagligt og hava ábyrgd av námsfrøðiliga virkseminum á staðnum. Hetta arbeiðið fevnir millum annað um vitanardeiling, ráðgeving, prosesstýring og fasilitering av átøkum. Umframt samstarv við skúla- og dagstovnaleiðslur, teirra starvsfólk og foreldur, ger Sernám eisini ymiskar venjingar, kanningar og samrøður. Umframt at ráðgeva í mun til einstøk børn, verður dentur lagdur á at ráðgeva í mun til umhvørvið, sum barnið er partur av. At vera partur av einum felagsskapi hevur stóra ávirkan á menning, læring og trivnað hjá einstaka barninum.

Við førleikastovunum skulu lærarar og næmingar fáa neyðuga hjálp so tíðliga sum gjørligt, og eru førleikastovur í tøttum samstarvi við Sernám, tá tørvur er á meirvitan/servitan.

Sernám verður fíggjað umvegis fíggjarlógina, og játtanin seinastu árini hevur verið henda:
2018: 19.752.000 kr.
2019: 19.950.000 kr.
2020: 20.740.000 kr.
2021: 21.355.000 kr.
2022: 22.133.000 kr. (+ 500.000 kr. ísv. flóttar í Føroyum)

Hækkanir í játtanini seinastu árini hava fyri tað mesta verið vegna sáttmálabundnar lønarhækkanir. Í játtanini eru á leið 34 ársverk, sum inniber, at 86-91 % av játtanini til Sernám fer til lønarútreiðslur.

Størvini eru býtt soleiðis á ymisku fakbólkarnir (2022):

| Leiðsla og fyrisiting | Ergo- og fysioterapeutisk ráðgeving | Sálarfrøðilig ráðgeving | Sernámsfrøðilig ráðgeving | Ráðgeving innan talu, hoyrn, sjón, sersamskifti og lesing | Sálarfrøðiliga tænastan á miðnámi |
|---|---|---|---|---|---|
| 5,5 | 1,3 | 9,5 | 9 | 8,9 | 2,3 |

Hesi starvsfólk veita ráðgeving til:
- 64 dagstovnar, har umleið 5.000 børn, 1.600 starvsfólk og 100 leiðarar eru.
- 43 fólkaskúlar og 11 sertilboð/serskipanir, har umleið 7.000 børn, 950 starvsfólk og 100 leiðarar eru.
- Sálarfrøðiliga tænastan umfatar teir 7 miðnámsskúlarnar, umframt serbreytir og -flokkar, og eftirskúlan Rásina.
  (Tølini eru frá 2021).

Ráðgeving frá Sernámi til dagstovna- og fólkaskúlaøkið er grundað á og útint í tøttum samstarvi við leiðslur og starvsfólk á dagstovnum og skúlum. Tørvurin á ráðgevandi hjálp hevur verið stórur í nógv ár og er alsamt vaksandi. Tískil er neyðugt hjá dagstovnum og skúlum at raðfesta, hvat hjálpin frá Sernámi verður brúkt til. Í samráð við Sernám verður síðani avgjørt, hvørji átøk arbeiðast skal við fyri at stuðla undir menning og læring hjá børnum.

Sernámsfundir eru inngongdin til Sernám. Stúranir hjá dagstovnum og skúlum verða umrødd á sernámsfundum, og møguleiki er eisini fyri yvirskipaðari ráðgeving á hesum fundum. Síðani verður avgerð tikin um, hvørji mál dagstovnur/skúli og Sernám fara í eitt samstarv um, og ein átaksætlan verður gjørd. Sernámsfundir verða tilrættalagdir fyri 1 ár í senn. Dagstovnar hava 2 sernámsfundir um árið, meðan skúlar hava 2-4 sernámsfundir um árið, alt eftir stødd. Skúlar við færri enn 20 næmingum hava ikki egnan sernámsfund, men hava atgongd til hjálp frá Sernámi umvegis sína førleikastovu.

Sernám ger saman við dagstovni/skúla eina átaksætlan, ið er eitt samstarvsskjal, har endamálið við átakinum og ábyrgdarbýtið millum partarnar verður lýst. Átaksætlanir eru ofta galdandi fyri eitt tíðarskeið á nakrar til fleiri mánaðir, t.d. 1 skúlaár. Sernám hevur fastar tíðir á øllum størri skúlum í Føroyum, har virksemi í átaksætlanum verður tilrættalagt. Við støði í vitan hjá omanfyrinevndu fakbólkum verður saman við dagstovnum/skúlum funnið fram til átøk, ið kunnu stimbra menningina, og økja um møguleikan fyri at kunnu taka lut og samskifta í læristøðum og felagsskapum. Sostatt er uppgávan at geva børnum og ungum

fjølbroyttar møguleikar at trívast, læra og mennast út frá egnum fortreytum. Ráðgeving frá Sernámi tekur støði í tørvi hjá skúlum og dagstovnum, og hesin tørvurin kann vera sera ymiskur. Foreldur venda sær til dagstovn ella skúla við síni stúran. Tá talan er um einstøk børn, eru foreldrini altíð ein partur av tilgongdini, sum dagstovnurin/skúlin hevur saman við Sernámi. Sernám ráðgevur ikki familjum uttanum dagstovn/skúla, og Sernám ráðgevur heldur ikki beinleiðis inn í heimið hjá barninum.

Hjálp frá Sernámi er ikki tengd at sjúku ella diagnosu, men snýr seg um tørvin hjá einum skúla/dagstovni í mun til tørvin hjá einum ella fleiri børnum, ella tørvin hjá starvsfólkunum, tá talan er um menning, læring og trivnað hjá børnum 0-18 ár.

Yvirskipað kann sigast, at dagstovnar/skúlar ynskja hjálp, tá menning og læring hjá børnum ikki gongur sum ætlað. Manglandi trivnaður er ofta eitt undirliggjandi evni, sum hevur stóra ávirkan á menningina og læringina hjá einum barni. Harafturat hevur luttøka í felagsskapi grunnleggjandi týdning fyri menning og læring hjá børnum, og er tískil neyðugt at arbeiða við.

Ynski um ráðgeving snúgva seg ofta um hesi evni:
- Tá ivi er um fakligar førleikar og útbúgvingarætlan eftir fólkaskúla
- Børn, sum ikki megna at hugsavna seg, hava lágt arbeiðsminni ella ikki mennast aldurssvarandi
- Sosialar avbjóðingar hjá børnum, avbjóðingar við at knýta relatiónir, einsemi og happing
- Børn, sum stríðast við sálarheilsuavbjóðingar, sum t.d. ótta og angist.
- Flokkur, sum er ófriðarligur, herverk ella áganggandi atburður
- Foreldur stúrin um sítt barn, truplar familjustøður
- Skúlafrávera/skúlaaftran

Yvirskipað kunnu vit siga, at ynski um ráðgeving eru í mun til: Fakligar førleikar, sosialar avbjóðingar og sálarheilsustøðu.

Ráðgevingin tekur sum heild útgangsstøði í at skilja atferðina hjá børnunum, og hvussu tey vaksnu, sum eru um børnini, við skilagóðum rammum og viðkomandi námsfrøði, kunnu stuðla teirra menning, læring og trivnaði á skilagóðan hátt.

Sernám er eisini ráðgevandi í mun til kreppustøður á skúlum, t.d. tá talan er um kynsligan ágang, sjálvmorðsroyndir, deyða o.a.

Sambært kunngerð er Sernám høvuðsráðgevandi eindin, sum hevur innlit og yvirlit yvir nemingatal, skipan og arbeiðið í serflokkunum/serskúla. Tilknýtið og atgongd til vitan frá Sernámi er skipað eftir avtalaðum leisti við Sernám. Harumframt er Sernám ein av fleiri limum í upptøkubólkunum til serflokkarnar, sum er staðfest í kunngerð.

Umframt omanfyrinevnda virksemi, hava starvsfólk í Sernámi javnan fyrilestrar og verkstovur á dagstovnum/skúlum, eitt nú til námsfrøðiligar fundir í skúlum, til foreldrafundir, um evni so sum málmenning, autisma, ADHD, skúlafrávera o.s.fr. Eisini verður skipað fyri skeiðsvirksemi innan tekn til talu, staming, TRAS, umframt onnur skeið í samstarvi við Nám.

Harumframt eru hálvárligir fakdagar fyri allar førleikastovur og fyri allar serflokkar á skránni, har ymisk evni verða viðgjørd við uppleggum og verkstovum.

Sernám samstarvar við aðrar skipanir á barna- og ungdómsøkinum í Føroyum, so sum Gigni, B&U Psykiatriin, Almannaverkið og Barnaverndartænasturnar. Stórur partur av hesum samstarvi fevnir um netfundarvirksemi.

# 7.2 Skipanir innan heilsuverkið

**Barna- og ungdómspsykiatriin**
Barna- og ungdómspsykiatriin (B&U) veitir psykiatriska útgreining og viðgerð til børn, ung og familjur teirra. Áðrenn familjan og barnið fáa viðgerð bjóðað, verður gjørd ein nágreinilig útgreining av barninum, ið hevur fokus á at lýsa barnið í fleiri ymiskum kontekstum, bæði heima, í skúlanum, inni til sjálva kanningina, umframt hvussu liviumstøður og menning hjá barninum hava verið heilt frá føðing av.

Tískil miðar B&U í minsta lagi ímóti, at útgreiningin umfatar samrøður og sálarfrøðiliga kanning av barninum, Anamnesa (t.e. menningarsøgan hjá barninum) við foreldrunum og lýsing frá skúlanum um, hvussu barnið er í skúlahøpi.

Núverandi viðgerðartilboð í B&U eru m.a.:

- Netverksfundur við tey, ið eru um barnið dagliga, m.a. foreldur, skúli, Sernám, Almannaverkið, Barnaverndartænastur v.fl.
- Heilivágur
- Sálarfrøðiligar samrøður í mun til t.d. ótta ella tunglyndi, stuðlandi samrøður til barnið í eitt avmarkað tíðarskeið, einstaklinga undirvísing um sálarlig viðurskifti (psykoedukatión) í bólki til barnið/tann unga (ADHD og autisma). Bólkaviðgerð fyri ung við avbjóðing við kensluregulering (DAT)
- Individuel foreldraráðgeving til foreldur at børnum við ADHD (NFPP), foreldraráðgeving í bólki til foreldur við ADHD og bólkaviðgerð til foreldur og børn/ung, ið hava ótta (Cool Kids og Chilled).

Størsta avbjóðingin í dag er bíðitíð, bæði hvat viðvíkur at sleppa framat til útgreining, umframt at sleppa framat fleiri av bólkatilboðunum skjótt eftir lokna útgreining.

G.G! At tá partar av hesum tilmælið er skrivað (desember 2022), var Gigni ein stovnur undir Heilsumálaráðnum, men er nú ein stovnur undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

**Gigni**
Gigni virkar samsvarandi ásetingunum í:

Løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung

Løgtingslóg nr. 52 frá 30. apríl 2018 um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung

Kunngerð nr. 4 frá 9. januar 2019 um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung.

Somuleiðis fylgir Gigni vegleiðingini hjá danska Sundhedsstyrelsen.

Tað eru heilsufrøðingar, sum arbeiða í Gigni. Ein heilsufrøðingur er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur, sum umframt kravdar arbeiðsroyndir við børnum, hevur nomið sær hálvtannað ára víðari útbúgving í Danmark innan servitan um børn, ung og barnafamiljur.

Gigni hevur sum mál at hava einstaklingasamrøðu við næmingar í øllum flokkum, men ein avbjóðing er, at orkan røkkur ikki til at hava samrøðu við allar næmingar á hvørjum ári. Heilsufrøðingurin hevur tætt samstarv við flokslærararnar og foreldrini. Ein styrki er, at foreldur vita, at tey altíð kunnu seta seg í samband við heilsufrøðingin. Heilsufrøðingurin skipar somuleiðis fyri bólkaundirvísing, floksundirvísing, samrøðum um trivnað og um evnir, sum eru viðkomandi fyri heilsuna.

Heilsufrøðingar gera funktiónskanningar av børnum ígjøgnum alla skúlagongdina. Endamálið við funktiónskanningunum er tíðliga at finna fram til og fyribyrgja sjúkum og skeivari menning, og at fremja heilsu. Funktiónskanningarnar kunnu geva orsøk til víðari kanningar innan heilsuverkið og er tí eitt týdningarmikið amboð, har tað t.d. er illgruni um niðursettar likamligar førleikar, væntandi trivnað, vakstrar- og/ella vekttrupulleikar o.s.fr.

Heilsufrøðingarnir hava eisini heilsukunnandi samrøður við børnini ígjøgnum alla skúlagongdina.

Harafturat hava teir eisini samrøður við børnini í flokkum, sum hava serligan tørv. Tað kann vera í mun til allan flokkin vegna væntandi trivnað, serligan tørv hjá onkrum næmingi o.s.fr. Tað eru bæði næmingar, foreldur og lærarar, sum kunnu gera vart við, at flokkurin hevur tørv á einum serligum átaki frá heilsufrøðinginum. Øll foreldur verða biðin um at geva samtykki til, at heilsufrøðingurin og flokslærarin samstarva um børnini.

Heilsufrøðingurin brúkar ein stóran part av síni tíð til tørvssamrøður. Tørvssamrøður og tørvskanningar skulu bjóðast í øllum flokkum av heilsufrøðingi og lækna, alt eftir hvør trupulleikin er. Tørvssamrøðurnar kunnu gerast sum framhald av teimum regluligu samrøðunum, men bæði foreldur, aðrir fakbólkar og børnini kunnu eisini koma til heilsufrøðing í opnari viðtalu.

Tørvskanningarnar kunnu eisini gerast sum uppfylging av teimum regluligu kanningunum, ella við grundarlagi í eftirspurningi frá foreldrum ella barninum sjálvum. Tað kunnu vera trupulleikar við sjónini, hoyrnini, vekt ella øðrum. Um lærarar biðja um tørvssamrøðu ella tørvskanning, skulu foreldrini vita av tí áðrenn. Tá næmingar hava tørv á eyka samrøðum ella serligari hjálp, útloysir tað ofta fleiri samrøður við foreldrini eisini.

Endamálið við innskúlakanningini er at meta um heilsuna hjá barninum, trivnað, og um barnið heilsuliga er skúlabúgvið. Eisini verður vegleitt um viðurskiftir, sum viðvíkja heilsuni, og sum hava týdning í sambandi við skúlabyrjan. Innskúlakanningin verður gjørd, meðan foreldrini eru til staðar. Afturat funktiónskanningini verður mett um heilsuligu viðurskiftini hjá barninum, sosialu førleikarnir bæði heima og í skúlanum, svøvn- og kostvanar, málsligar førleikar og menningarstøði hjá barninum bæði kognitivt og motoriskt. Tá barnið hevur avbjóðingar, verða foreldur og barn ávíst víðari til viðkomandi fakfólk, og skúlin fær boð, so møguleiki eisini er at seta neyðug tiltøk/stuðul í verk.

Endamálið við útskúlakanningini er at gera eina heildarmeting av heilsuni hjá tí unga við endan av skúlagongdini. Útskúlakanningin er ein einstaklingasamrøða og kanning av tí unga við støði í hansara ynskjum, umframt í vitanini hjá heilsufrøðinginum um heilsusemi ígjøgnum skúlagongdina. Ung, sum eru 15 ár ella eldri, kunnu sjálvi geva samtykki til kanning og samrøðu. Í útskúlakanningini verður tosað um trivnað, relatiónir og netverk, um atferð og vanar í mun til kost og um rørslu og rúsevnir. Somuleiðis verður tosað um seksualitet og fyribyrging av kynssjúkum. Roynt verður altíð at fáa tann unga til at greiða frá møguligum trupulleikum og koma við loysnum, soleiðis at tann ungi kennir ábyrgd fyri egnari heilsu. Hetta verður gjørt í einum dialogi og við grundarlagi í fakligu vitanini hjá heilsufrøðinginum.

Heilsufrøðingurin hevur eisini bólkasamrøður og floksundirvísing í ymiskum aldursbólkum.

Í innskúlingini verður serliga lagdur dentur á kropsfatan og vitan um kropsliga tørvin í mun til svøvn, mat, rørslu, reinføri o.s.fr. Eisini verður tosað um kropstilvitan, soleiðis at barnið verður vitandi um egnu kensluligu, kropsligu og kynsligu mørk, og fyribyrging av likamligum og kynsligum ágangi. Eisini verður tosað um trivnað, skíggjanýtslu o.s.fr.

Í miðdeildini eru tað serliga evnini likamligar, kensluligar og sosialar broytingar, trivnaður og kynsbúning, umframt skíggjanýtsla.

Í hádeildini verður serligur dentur lagdur á evnini rúsdrekka/rúsevnir, bólkar og bólkatrýst, seksualundirvísing, fyribyrging, kynssjúkur o.s.fr.

Heilsufrøðingar kunnu luttaka á foreldrafundum, um lærarar, næmingar ella heilsufrøðingurin sjálvur meta tað vera viðkomandi.

Á leið 5. mió. kr. av játtanini hjá heilsufrøðingunum verða brúktar í skúlaverkinum árliga.

# 7.3 Skipanir innan almannaverkið

**Ráðgevingarskylda**
Sambært Almannalógini (Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur) hevur Almannaverkið skyldu at ráðgeva persóni ella familjum um, hvør hjálp kann veitast sambært Almannalógini og í mun til aðra almannalóggávu, umframt at vísa á møguleikar fyri hjálp frá øðrum myndugleikum og sjálvsognarstovnum. Er talan um barn, ið hevur fingið brek ella varandi sjúku, skal Almannaverkið veita skjóta ráðgeving um, hvør hjálp kann veitast til persónin og til avvarðandi.

Eisini áleggur Almannalógin starvsfólki, ið útinna almenna tænastu ella starv, at boða Almannaverkinum frá, tá tað í yrki sínum fær kunnleika um, at persónur hevur tørv á hjálp sambært Almannalógini.

Almannaverkið hevur ábyrgd at samskipa ta hjálp, ið kann veitast sambært Almannalógini. Er persónur eisini undir fyriskipan hjá øðrum myndugleikum ella sjálvsognarstovnum, skal Almannaverkið samstarva og samskipa við myndugleikan og sjálvsognarstovnin.

Tænastur og fíggjarligar veitingar eftir Almannalógini eru serliga ætlaðar í teimum førum, har varandi sjúkur ella týðandi likamligar ella sálarligar forðingar gera, at næmingur ikki megnar eitt vanligt gerandislív. Talan kann vera um vegleiðing um at handfara forðingarnar, at menna virknisførleikar hjá næmingi, at avlasta foreldur, at stuðla við hjálparráðum, ið kunnu bøta um samskiftis møguleikarnar, og møguleikan at hava ein virknan gerandisdag, og at stuðla fíggjarliga har forðingarnar hava við sær meirútreiðslur. Niðanfyri verða tey ymsu stuðulsøkini lýst nágreiniligari.

**Heimavegleiðing**
Heimavegleiðing kann verða veitt persóni ella familju, ið hevur dagliga umsorgan fyri barni við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku. Talan kann vera um barn, sum hevur torført við at hugsavna seg heima um skúlating ella vanligar uppgávur í heiminum. Uppgávan hjá heimavegleiðara er at undirvísa í mun til brekið ella sjúkuna, og at hjálpa familjuni við at finna ymiskar loysnir, sum hóska til júst hesa familjuna.

Játtanin fyri 2021 og 2022 var ávikavist 2.720 t.kr. og 3.511 t.kr. Talan er um 7 ársverk. Talan var um umleið 292 børn í skúlaaldri.

**Endurgjald vegna brek ella varandi sjúku:**
Persónur, sum í heiminum uppiheldur barni við likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku, hevur rætt til at fáa endurgoldið neyðugar meirútreiðslur, ið eru ein beinleiðis avleiðing av brekinum ella sjúkuni. Endamálið er at fyribyrgja, at brekið ella sjúkan hjá barninum versnar ella fær aðrar og meiri álvarsligar fylgjur, eins og endamálið er at stuðla undir, at familjan fær eina so vanliga tilveru sum møguligt, og at barnið kann vera sum longst heima.

Meirútreiðslur eru uppihaldsútreiðslur, ið standast av brekinum ella sjúkuni, og útreiðslur til viðgerð, ið er fevnd av sáttmála við Heilsutrygd.

Dømi um meirútreiðslur í sambandi við uppihaldsútreiðslur, kunnu verða útreiðslur til serligan klæðnaútbúnað vegna óvanliga nógv slit, serligar skógvar, serligan kost ella kostískoyti vegna diabetes ella ovurviðkvæmi, flutningsútreiðslur, serligt tilevnaðar leikur, og serlig skeið til foreldur, ið hava beinleiðis samband við ansing, røkt, uppaling, venjing, ríðing, stimbran o.a.
Dømi um viðgerð er m.a. viðgerð hjá fysioterapeuti, ergoterapeuti, fótterapeuti og sálarfrøðingi.

**Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku:**
Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku kann veitast persóni, sum hevur inntøkumiss, tí viðkomandi í heiminum ansar barni við breki ella varandi sjúku ella má vera

hjá barninum í ávíst tíðarskeið í sambandi við viðgerð. Talan er um persón, sum fer av arbeiðsmarknaðinum fyri at vera um barnið fult og heilt, og talan kann vera um persón, sum fer í lægri starvsbrot ella persón, sum er burtur frá arbeiði í ávís tíðarskeið. Endurgjaldið er í mesta lagi 25.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og bundna eftirlønargjaldið sambært løgtingslóg um eftirløn. Upphæddin verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent.

Játtanin fyri 2022 var 13.500 t. kr. til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, og 5000 t.kr. til endurgjald fyri meirútreiðslur. Rakturin var 4.729 t.kr. og um 11 ársverk. Talan var umleið 542 børn í skúlaaldri.

### Fíggjarligur stuðul til bil

Stuðul kann verða veittur til at keypa bil til barn við varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleikum, ið munandi skerja møguleikarnar at ferðast, ella har bilurin munandi bøtir um avleiðingarnar av niðursetta førleikanum, ella munandi lættir um gerandisdagin. Stuðulin verður veittur sum eitt rentufrítt lán, sum í mesta lagi er 180.000 kr. Upphæddin verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosentir. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi í sambandi við avmarkaða førleikan, kann eitt rentufrítt og avdráttarfrítt lán veitast til at gjalda munin millum stuðulin á 180.000 kr. og prísin fyri at útvega ein dýrari bil.

### Stuðul til bústaðarbroytingar

Stuðul kann verða veittur til at innrætta bústað, um barnið hevur týðandi og varandi skert virkisføri, og mett verður, at bústaðarbroytingin er neyðug fyri at bústaðurin verður betur egnaður sum tilhald.

### Hjálparráð

Hjálparráð kann verða veitt barni við virkistarni orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku, um hjálparráðið munandi bøtir um avleiðingarnar av sjúkuni ella brekinum, ella munandi lættir um gerandisdagin í heiminum.

Talan kann vera um kropsborin hjálparráð, so sum



brillur, hoyritól, ymiskar protesur og serligan fótbúna, og hjálparráð, ið verða veitt sum lán, sum t.d. koyristólar, samskiftisútgerð og ymisk flutningstól.

Hjálparráð, sum t.d. heilsuverkið, kommunur og skúlaverkið nýta í virksemi sínum, sum er skipað sambært aðrari lóggávu, eru ikki fevnd av hjálparráðum heimilað í almannalógini.

### Stuðulstænasta

Stuðulstænasta kann verða veitt barni, sum hevur likamligt og sálarligt brek. Tænastan er m.a. ætlað børnum við fjølbreki, menningartarni, sálarsjúku, seinheilaskaða, autismu, ADHD v.m.

Stuðulin kann fevna um:

- Námsfrøðiliga leiðbeining, har uppgávan er at bjóða hjálp, sum stuðlar og styrkir um møguleikan fyri at fáa eitt virkið og innihaldsríkt lív bæði persónligt og sosialt. Talan var um 18 børn í skúlaaldri, meðan bíðilistin var um 18 børn.
- Praktisk hjálp sum t.d. at megna vanligar gerandisuppgávur. Talan var um umleið 1 barn í skúlaaldri, meðan bíðilistin var umleið 2 børn.
- Fylgjara, sum kann hjálpa einum at ferðast uttan fyri heimið einsamallur, eitt nú til frítíðarvirksemi.
- Hjávera og vøka, sum kann fevna um at vera hjá og vakja hjá børnum, sum av eini ella aðrari orsøk ikki kunnu vera einsamøll. Talan var um umleið 12 børn í skúlaaldri, meðan bíðilistin var umleið 1 barn.

Omanfyri nevndu tænastur – undantikið námsfrøðiliga leiðbeiningin - kunnu skipast sum borgarastýrd tænasta, har foreldur ella annar persónur, ið er um barnið, ger av, hvør verður stuðulspersónur, og hvussu og til hvat játtaðu stuðulstímarnir verða brúktir.

### Virknistænasta

Barn við likamligum ella sálarligum breki, kann fáa pláss á dagstovni og frítíðarheimi hjá Almannaverkinum, um so er, at barnið ikki kann vera á kommunalum dagstovni ella frítíðarheimi sambært løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt.

Endamálið við at veita dagstovnapláss og frítíðartilboð er, at foreldrini hava møguleika at varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin, og at barnið, sum ikki megnar at vera á vanligum dagstovnaplássi ella frítíðartilboði, kann fáa ein innihaldsríkan og mennandi gerandisdag á jøvnum føti við sínar javnaldrar. Talan var um umleið 48 børn í skúlaaldri, meðan bíðilistin var umleið 29 børn.

### Umlætting

Foreldur, sum hava børn við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella við víðfevndum sosialum trupulleikum kunnu fáa umlætting. Talan var um umleið 31 børn í skúlaaldri, meðan bíðilistin var umleið 40 børn.

### Flutningstænasta:

Almannaverkið hevur heimild at veita flutning í sambandi við avgerð um tænastu. Hetta er tó treytað av, at viðkomandi ikki sjálvur kann brúka almennar ella privatar flutningstænastur ella at koyra við egnum bili til tænastuna. Henda skipan er ikki komin at virka enn grundað á manglandi fígging.

Er talan um flutning í sambandi við skúlagongd, er tað skúlaverkið, ið skipar fyri hesum.

### Bústaðir

Børn og ung við likamligum ella sálarligum trupulleikum kunnu fáa tilboð um fyribils uppihald á bú- og viðgerðarstovni eftir almannalógini. Hesi børn eru ikki umsorganaryvirtikin, men bera brek ella hava tørv, ið hevur við sær, at teimum tørvar sosialpedagogiskan stuðul, viðgerð og/ella røkt.

Endamálið er at greina støðuna hjá viðkomandi við tí fyri eyga at veita rættar og nøktandi tænastur, og soleiðis at stuðla undir og menna førleikarnar, so viðkomandi kann megna eitt so sjálvstøðugt lív sum gjørligt.

Í serligum førum kann varandi bústaður veitast til børn og ung.

Er barnið sett heiman, tí tað livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, verður tað innskrivað á bú- og viðgerðarstovni sambært barnarverndarlógini. Talan var um umleið 13 børn í skúlaaldri, ið vóru knýtt at Barnaverndarstovni.

# 8. Snávingarsteinar og átøk

Í hesum partinum verður greitt frá snávingarsteinum í verandi skipanum og boð upp á átøk fyri at bøta um avbjóðingarnar.

Tey eru býtt í tríggjar høvuðsbólkar:

- Fleiri hendur
- Betri karmar
- Skjótari hjálp

# 8.1 Fleiri hendur

### ÁTAK NR. 1: CO-TEACHING – 3 ÁRA ROYNDARVERKÆTLAN

### SNÁVINGARSTEINUR

Skúlaverkið hevur tørv á alsamt at mennast og broytast soleiðis, at tað kann skapa rúm fyri og veita nøktandi og mennandi skúla til nútíðar samfelagið og nútíðar nämingin. Broyttur hugburður til børn, barnalív, og hvussu børn og ung síggja seg sjálvan sum næmingar, setur krøv til skúlaverkið at endurhugsa endamál og arbeiðshátt. Tað verður m.a. ført fram, at tørvur er á at skipa skúladagin og undirvísingina øðrvísi við eini øktari starvsfólkamongd og samanseting. Hetta ger seg serstakliga galdandi, um skúlin skal arbeiða fram eftir eini inkluderandi kós, har flestu næmingar rúmast, kenna seg eiga virknan lut í felagsskapinum í skúlanum, kenna seg góðtiknar og fáa høvi at mennast og læra, við hóskandi stuðli, samskipan og inklusjón í huga.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** *Co-teaching – 3 ára royndarverkætlan*

### ENDAMÁL

Ein royndarskipan við Co-teaching kundi givið skúlaverkinum eina ábending um, hvussu Co-teaching hugtakið kundi verið sett í verk í føroyska fólkaskúlanum og møguliga verið tillagað føroysk viðurskifti. Hugtakið minnir um tvílæraraskipanina, sum er sett í verk í innskúlingini, men munurin er, at Co-teaching verður skipað eftir heilt serligum prinsippum. Hugtøkini inklusjón, hóskandi stuðul, samskipan og skipan eru hornasteinar í Co-teaching hugsanini.

### LÝSING

Amerikanski granskarin innan skúla og námsfrøði Marilyn Friend hevur ment Co-teaching. Hon brúkar sjálv hugtakið einastandandi (exceptional) um næmingar, sum t.d. hava serligan tørvir, eru serliga gávað, hava serligar sjúkur ella aðrar avbjóðingar, eru serliga útsett o.s.fr. Orðið *einastandandi* verður brúkt fyri at gera tað greitt, at ymiskleiki ikki er ein trupulleiki, men ein fortreyt í øllum skúlafelagsskapum. Í Danmark er tað serliga granskarin Janne Hedegaard Hansen, sum hevur granskað í hesum háttinum at skipa undirvísing uppá.

Co-teaching hevur víst seg aðrastaðni at hava riggað væl, og verður av fleiri granskarum mett sum ein fortreyt fyri, at skúlin í dag skal kunna megna at veita eitt inkluderandi, mennandi og lærandi skúlatilboð til øll børn í nútíðar samfelagnum. Co-teaching leggur upp til, at tvey ella fleiri fakfólk við ymiskari fakligheit, saman og á jøvnum føti fyrireika, gjøgnumføra og eftirmeta undirvísingina í í flokkinum í felag. Endamálið er at fáa fleiri faklig eygu á næmingin og felagsskapin, og at hava fleiri hendur inni í flokkinum fyri at skapa ein barnavinarligan skúlafelagsskap, sum tekur hædd fyri og tekur sær av fjølbroytninum í næmingahópinum.

Hetta er ein samstarvsháttur, sum samanflættar almenna námsfrøði og sernámsfrøði við denti á undirvísing av øllum næmingum. Co-teaching er ein samstarvsháttur, sum fatar um alla skúlaskipanina í tí ávísa skúlanum. Co-teaching snýr seg um, hvussu mann setir saman vitan um didaktik, fak og sernámsfrøði, soleiðis at tað verður møguligt at fevna ymiskleikan hjá næmingunum í undirvísingini, og samstundis fremja læring, sum ikki førir til stigmatisering av ávísum næmingum.

## KOSTNAÐUR

Í alt umleið 2,5 mió. kr. árliga yvir 3 ár, t.v.s. í alt yvir 3 ár 7,5 mió. kr.

Íroknað 2 mió. árliga til 1 eyka starvsfólk afturat í 4 flokkum, t.v.s. 4 flokkar sum royna co-teaching. Hesir 4 flokkarnir við eyka starvsfólkum verða í ávikavist miðdeild og hádeild í hesum báðum skúlum, einum miðal og einum stórum skúla. Hetta so at starvsfólkini í toymunum menna í felag.

150 tús. kr. árliga til førleikamenning (2-3 ferðir árliga).

350 tús. kr. árliga til 1/3 starvstíð í 3 ár, til eitt starvsfólk/granskingarfólk á Námsvísindadeildini at leiða verkætlanina, fylgja henni, skriva frágreiðing, møguligt tilmæli, skeiðsvirksemi o.s.fr.

## TÍÐARÆTLAN

3 ára royndarverkætlan.

## ÁBYRGD

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, ráðgevandi og útbúgvandi stovnar, skúlaleiðslur og starvsfólk í skúlunum.

## EFTIRMETING

Royndarverkætlanin eigur at setast upp sum ein verkætlan, sum ein nágreinaður bólkur av fakfólkum fylgir og eftirmetir, t.d. viðkomandi granskarar/námslektarar á Námsvísindadeildini saman við møguliga serkønum á Sernámi og/ella Námi. Játtan til hetta fylgiarbeiði og eftirmeting má raðfestast og setast av.

## ÁTAK NR. 2
## TVÍLÆRARASKIPANIN VÍÐKAST

## SNÁVINGARSTEINUR

Nógv hava peikað á floksstødd sum ein snávingarstein, tá ov nógvir næmingar eru í hvørjum flokki, og tá ov fáar lærarakreftir eru til hvønn einstakan næming. Tí um lærarin ikki hevur nóg nógva lærаratíð til hvønn næming, so kunnu næmingarnir lættari gerast strongdir, uppgevandi, byrja at órógva undirvísingina vegna vantandi bindindi v.m.

Fólkaskúlalógin er frá 1997, og hevur tí 25 ár á baki. Ein arbeiðsbólkur er í gongd við at eftirmeta fólkaskúlalógina, og hevur tann bólkurin á skrá m.a. hetta málið.

Okkara arbeiðsbólkur hevur eisini viðgjørt floksstødd, men í hesum arbeiðinum hava vit flutt okkum frá næmingatalinum til heldur at hyggja at tvílæraraskipanini.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** *Tvílæraraskipanin verður víðkað til at fevna um grund-, mið- og hádeild.*

## ENDAMÁL

Við meira lærаratíð til hvønn einstakan næming er endamálið at skapa betri umstøður fyri næmingin at trívast, mennast og læra. At skapa eina góða skúlabyrjan og eina góða og trygga skúlamentan.

## LÝSING

Undir koronatíðini skipaðu fleiri skúlar flokkarnar í smærri eindir, og afturboðanirnar av hesum hava verið jaligar. Við at hava fleiri hendur um børnini meta vit í arbeiðsbólkinum, at mann kann fyribyrgja og møguliga minka um tørvin á serskipanum. Førleikin til at røkja námsfrøðiligu og didaktisku uppgávurnar tykist verða til staðar í fólkaskúlanum, avbjóðingin sýnist tó at vera manglandi tíð og umstøður.

Við eini tvílæraraskipan í øllum árgangum, sum vit kenna hana úr 1. og 2. fl., hevði borið til hjá skúlunum at skipa undirvísingina í smærri bólkum eftir tørvi og soleiðis rokkið næmingunum betur. Við hesum ber til at varðveita fyrimunirnar í stórum flokki, og samstundis fáa fyrimunirnar av at kunna skipa smærri bólkar í ávísum fakum o.s.fr.

**Verandi tvílæraraskipan í 1. og 2. flokki:**

| Næmingatal | Tímatal 1. fl. | Tímatal 2. fl. |
|---|---|---|
| 18 | 29 | 29 |
| 19 | 30 | 30 |
| 20 | 32 | 32 |
| 21 | 34 | 34 |
| 22 | 35 | 35 |
| 23 | 37 | 37 |
| 24 | 38 | 38 |
| 25 | 40 | 40 |
| 26 | 42 | 42 |

*Kravt tímatal í 1. flokki:* *24*

*Kravt tímatal í 2. flokki:* *26*

Verandi tvílæraraskipan verður víðkað til at fevna eldru árgangirnar eisini. Kravda tímatalið økist fyri hvønn árgang, men í hesum tilmælinum verður ikki lagt upp fyri hesum, skilt soleiðis, at víðkaða tvílæraraskipanin verður grundað á somu skipan sum í 2. flokki við í mesta lagi 26 tímum um vikuna. Tvílæraraskipanin í eldru flokkunum er tí lutfalsliga minni enn í yngru flokkunum sambært hesum tilmælinum. Grundgevingin fyri tí er, at mett verður, at tørvurin minkar nakað við aldrinum hjá næmingunum.

## KOSTNAÐUR

Tvílæraraskipanin, sum nú er galdandi fyri 1. og 2. flokk, kostar á leið 10 mió. kr. árliga. Skuldi hon verið víðkað at fevnt um alt skúlaverkið eftir sama leisti sum nú, er talan um ein eyka kostnað á 18 – 20 mió. kr, ið svarar til 35 – 40 ársverk afturat.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið

# 8.2 Betri karmar

**ÁTAK NR. 3: SKIFTI – SAMANHANGANDI SKIPAN FRÁ DAGSTOVNI TIL MIÐNÁM**

## SNÁVINGARSTEINUR

Skúlaleiðarar hava gjørt vart við, at tað seinastu árini er vorðið verri at fáa lærarar at støðast sum lærarar í grunddeildini, serliga í 1. flokki, og enn verri er tað at útvega lærarar at átaka sær flokslæraraleiklutin í serliga 1. flokki. Tað tykist verða misjavnt og ymiskt, hvussu klár og skúlabúgvin børnini eru, tá tey byrja í 1. flokki. Hetta kann geva ábendingar um, at tað møguliga er eitt ov stórt lop frá dagstovni til skúla, og at yvirgongdin tískil ikki altíð eydnast nóg væl. Ójavnt er runt landið, hvussu síðsta árið fyri skúlabyrjan verður skipað. Nøkur børn eru hetta árið í forskúla ella forskúlalíknandi tilboði, meðan onnur eru í barnagarði, har tey ávís tíðarskeið hetta árið eru í skúlabólki. Spurnartekin kann setast við, um skúlin er skipaður nóg væl at taka ímóti børnunum við teimum fortreytum, tey nú hava við sær í skiftinum frá dagstovni til skúla. Vit eiga at hava eitt fokus á barnið í síni heildarmynd sum menniskja, ið lærir og mennist gjøgnum alt lívið.

Vísast kann í hesum sambandi á tað, ið bólkur undir Vakstrarforum hevur orðað í sínum arbeiði hesum viðvíkjandi:

> *„Yvirskipaða málið er eitt útbúgvingarverk, sum røkkur frá vøggustovu til hægri lestur, og sum byggir brýr tvørtur um fakøki, geirar og stovnar og til lívlanga læru.*
>
> *Tilmæli 7: „Lopini frá dagstovni til fólkaskúla og frá fólkaskúla til miðnám skulu verða tikin burtur. Felags støðisnámsætlan við førleikamálum grundað á 21. aldarinnar førleikar skal fevna alt økið frá dagstovni til lokið miðnám og víðari til hægri lestur og læru.“*
>
> *Tilmæli 10: „10. flokkur skal umskipast við fleiri breytum, sum kunnu góðkennast sum partur av yrkisútbúgving.“*

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** *at samskipa dagstovnaøkið, fólkaskúlan og miðnám betur við lóg, kunngerðum, námsætlanum o.s.fr. so vit fáa eina samanhangandi skipan frá dagstovni til lívið eftir fólkaskúlan*

## ENDAMÁL

At okkara børn og ungu kenna seg trygg, mennast og læra alt sítt barna og ungdómslív, og at teirra skift frá vøggustovu til barnagarð til fólkaskúla til miðnám eins og til onnur skúlatilboð eftir fólkaskúlan gerast so høglig og góð sum yvirhøvur til ber. Somuleiðis er endamálið at finna út av, hvussu vit á bestan hátt tryggja okkum, at neyðug vitan og upplýsingar fylgja barninum tvørturum skift frá eitt nú dagstovni til skúla, og her mugu atlit takast til, hvørjar lógarforðingar eru millum tær ymsu skipanir. At samskipa dagstovnaøkið, fólkaskúlan og miðnám betur við lóg, kunngerðum, námsætlanum o.s.fr.

Góð vegleiðing fyri næmingarnar í hádeild er alneyðug, so valini til víðari leið eftir loknan fólkaskúla eru væl grundað og haldfør. Fyri gott og væl trimum árum síðani varð játtanin til skúlavegleiðing í fólkaskúlanum økt lutfalsliga nógv, og partur av arbeiðinum í sambandi við hetta átak, kundi verið at fingið lýst, í hvønn mun henda meirjáttan hevur verið og framyvir kann verða til gagns til at leiða tey ungu tann rætta vegin í samsvari við teirra førleikar og áhuga og fyri at rætta kós hesum viðvíkjandi, um neyðugt.

**Kostnaður:** eingin – verandi starvsfólkaorka.

**Tíðarætlan:** 3–6 mðr.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Kommunufelagið og møguliga útbúgvandi og ráðgevandi stovnar.

## ÁTAK NR. 4: MARKAMÓT

### SNÁVINGARSTEINUR

Arbeiðsbólkurin kann staðfesta, at allir partar eru samdir um, at talan er um ógreið og óskipað markamót millum Sernám, Gigni, B&U og førleikastovurnar.

Afturvendandi evnini eru millum annað manglandi kunning, mannagongdir, arbeiðsbýti, atkomuligheit, sjónligheit, bíðilistar og tagnaðarskylda.

> **Arbeiðsbólkurin mælir til:** At skipa hetta átakið í tveimum pørtum:
> 4.1 samstarv millum geirar og skipanirnar: Gigni, Sernám, Barna- og ungdómspsykiatri og førleikastovurnar
> 4.2 nágreina og gera eitt greitt arbeiðsbýti millum aktørarnar, sum samstarva og hava beinleiðis virksemi inni í skúlunum, tað veri seg førleikastovur, trivnaðarráðgevi hjá Námi, Gigni og Sernám.

### 4.1 Samstarv millum geirar og skipanir

Samstarv millum hesar geirar er ment seinastu árini, m.a. við Tí góðu tilgongdini (TGT), men tørvur er á, at tvørgeiraliga samstarvið millum skipanir á barna- og ungdómsøkinum áhaldandi mennist. Gigni er ikki fastur partur av TGT, men vit velja at taka tey við her, tí tey hava ein týðandi leiklut innan skúlaverkið.

Til hetta átakið eru 4 ítøkilig átøk vald, sum kunnu íverksetast innan stutta tíð:

- **Vitan skal latast frá dagstovni til skúla**

Tílíkir fundir millum dagstovn og skúla verða, sum er, viðhvørt hildnir. Hetta evni verður m.a. umrøtt undir „Góð skúlabyrjan" í námsfrøðiligu stevnumiðunum (s. 32). Arbeiðsbólkurin mælir til, at ein týðuligari ramma um hetta samstarv verður gjørd, soleiðis at dagstovnar altíð bjóða skúla og øðrum viðkomandi skipanum við á samstarvsfundirnar, tá talan er um barn, ið hevur fingið ávísa hjálp ella stuðul í mun til sína menning.

Sernám og Gigni eiga at luttaka, tá hesir stovnar hava viðkomandi vitan, eitt nú frá samstarvi við dagstovn og/ella frá innskúlakanning. Tílíkur fundur skal geva skúla, umframt øðrum møguligum samstarvspørtum, sum Sernámi og Gigni, møguleika at fyrireika skúlabyrjanina betri fyri tey, ið hava tørv á tí.

> **Arbeiðsbólkurin mælir til:** *At tað verður álagt dagstovnunum at taka stig til ein samstarvsfund áðrenn skúlabyrjan.*

**Ábyrgd:** Dagstovnar/Kommunufelagið og BUMR

- **Menning av visitatiónssamstarvi millum Sernám og B&U Psykiatri**

Átakið inniber, at Sernám og B&U Psykiatriin skipa eitt samstarv, áðrenn møgulig útgreining er gjørd. Átakið inniber kunning og vitanardeiling til skúlar og foreldur, í mun til hvussu arbeiðast kann sernámsfrøðiliga og sálarfrøðiliga í mun til stúranir hjá skúlum og/ella foreldrum.

> **Arbeiðsbólkurin mælir til:** *At leiðslurnar á stovnunum skipa hetta virksemi.*

**Ábyrgd:** Sernám og B&U Psykiatriin.

- **Broyting viðv. tilmæli (erklering) frá B&U Psykiatri**

Ynski er um, at skjøl til útgreiningarfundin, sum B&U Psykiatriin skipar fyri, kunnu sendast til viðkomandi luttakara áðrenn fundin, so møguleiki er at fyrireika seg til fundin. Í dag eru ivamál í mun til skrásetingarskyldu hjá luttakarum, og harvið hvørjir møguleikar B&U Psykiatri hevur at útflýggja tilfarið til aðrar partar. Harumframt verður mælt til, at tað verður arbeitt við orðingum í fráboðanum, soleiðis, at tað týðiliga

framgongur, hvørji tilmælini frá B&U Psykiatri eru, uttan at tað verður álagt, hvat ein skúli, Sernám, Gigni ella onnur skulu gera av ymiskum átøkum. Hetta vegna tað, at skúlar hava ymiskar fortreytir at seta í verk átøk, ið verða nevnd í fráboðanum.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** *At Barna- og ungdómspsykiatriin fær hetta í lag*

**Ábyrgd:** B&U Psykiatri í samstarvi við umboð fyri skúlaverkið, Sernám og Gigni

- **Menning av fakliga samstarvinum í TGT samstarvinum**

Eftirmeting av TGT samstarvinum er í gongd, har hesar skipanir hava gjørt ymiskar viðmerkingar. Í hesum átakinum verður undirstrikað tørvurin á at menna fakliga partin av tvørgeiraliga samstarvinum, sum longu er í TGT. Harumframt er ynski um at viðgera, hvussu Gigni kann gerast samstarvspartur í TGT.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** *At arbeiðsbólkurin, sum er settur at eftirmeta TGT, eisini tekur tað fakliga samstarvið við í arbeiðið.*

**Ábyrgd:** Almannaverkið í samstarvi við Sernám, B&U Psykiatri og Gigni.

### 4.2 nágreina og gera greitt arbeiðsbýti millum aktørarnar, sum samstarva og hava beinleiðis virksemið inni í skúlunum

#### SNÁVINGARSTEINUR

Nógv verður gjørt fyri at skapa umstøður, so at børnini trívast og mennast í fólkaskúlanum. Men tað tykist sum um, at talan kann verða um dubultfunktiónir, og at ivasamt er, um sama tænasta verður veitt runt alt landið.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** At leiðslurnar í Gigni, Sernámi og førleikastovurnar (UVS og BUMR) saman við trivnaðarráðgevanum í Námi og starvsfólkum á Námsvísindadeildini á Setrinum, fara undir eitt miðvíst arbeiði við at lýsa arbeiðsuppgávurnar, mannagongdir og arbeiðsbýtið fyri, hvussu trivnaðararbeiði eigur at verða skipað.

#### ENDAMÁL

At veita eitt inkluderandi og lærandi skúlatilboð til øll børn í føroyska fólkaskúlanum.[1] Fyri at røkka hesum málinum er neyðugt at arbeiða fyribyrgjandi og stuðlandi, og til tess er tørvur á at finna fram til eitt greitt uppgávu- og arbeiðsbýti millum Gigni, Sernám, trivnaðarráðgeva og førleikastovur.

#### LÝSING

Fyri at tryggja, at samlaða arbeiðsorkan verður brúkt á ein skynsaman hátt er tørvur á at finna útav, hvør hevur ábyrgd av hvørjum. Av tí at hetta tilmælið fevnur um trivnað og sálarliga heilsu, mælir arbeiðsbólkurin til, at leiðslurnar í Gigni, Sernámi, Undirvísingarstýrið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið saman við trivnaðarrágevanum í Námi fara undir eitt miðvíst arbeiði við at lýsa arbeiðsuppgávurnar, gera eitt greitt arbeiðsbýti, og gera mannagongdir fyri, hvussu verandi arbeiði við trivnaði eigur at verða skipað.

Tey seinastu árini eru ein røð av tilmælum skrivað, ið vísa á líknandi trupulleikar og avbjóðingar.[2]

**Kostnaður:** eingin – verandi starvsfólkaorka

**Tíðarætlan:** 6-12 mðr.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið

1 FL § 45 stk. 4 skúlaleiðarin §53 skúlastýrið, Kunngerð um flokslæraran §3 - §6 Kunngerð um førleikastovur §12

2 Námsfrøðilig stevnumið, Når noen må ta regien, Heildarætlan fyri sálarliga heilsu í Føroyum, Heildarætlan um at tálma og fyribyrgja rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028 og UNG við sálarligum og/ella sosialum avbjóðingum og útbúgving

## ÁTAK NR. 5: SKÚLAFRÁVERAN SKAL MINKA: EIN 3 ÁRA GRANSKINGARVERKÆTLAN

### SNÁVINGARSTEINUR

Skúlin er ein hin týdningarmesti pallurin í barnalívinum, og tað at møta í skúla, og ikki minst at „gjøgnumføra" skúlan, hevur víst seg at hava stóran týdning fyri fleiri týðandi viðurskifti í lívinum. Gransking týður á, at børn og ung, sum hava stóra fráveru ella ikki megna at gjøgnumføra skúlagongdina, í størri mun hava avbjóðingar bæði í uppvøkstrinum og seinni í lívinum, samanborið við tey, sum hava lága fráveru. Og her kann verða talan um avbjóðingar bæði innan trivnað, heilsulig, sosial, útbúgvingarlig og fíggjarlig viðurskifti.

Skúlaleiðarafelagið hevur víst á, at skúlafrávera hjá næmingum síðstu árini hevur verið ein alsamt vaksandi trupulleiki. Undirvísingarstýrið upplýsir somuleiðis um eina øking í umsóknum um heima og sjúkraundirvísing. Umframt at skúlarnir alsamt søkja um hesa serskipan til alt fleiri næmingar, er tað eisini í fleiri førum so, at teir næmingar, ið verða visiteraðir til sertilboð, hava havt ilt við at koma í skúla. Hesi børn eiga tí eisini at verða havd í huga, tá ið tað viðvíkur hagtølum fyri skúlaaftran og skipanini við heima og sjúkraundirvísing. Hetta er ein játtan til næmingar, sum av eini ella aðrari orsøk ikki megna vanliga skúlagongd.

Einstakir skúlar hava sett í verk sertilboð fyri næmingar, sum ikki megna at koma í skúla, og Sernám hevur raðfest økið við at útbúgva teirra starvsfólk í viðgerð og ráðgeving í teimum førum, har næmingurin als ikki megnar at koma í skúla. Men hetta røkkur ikki til at hjálpa øllum føroysku næmingunum við skúlafráveru. Nýggjasta altjóða granskingin innan økið týður á, at skúlafrávera er ein samansettur trupulleiki, bæði viðvíkjandi orsøkum til skúlafráveruna og í mun til fráverumynstur, eins og tað er av alstórum týdningi, at sett verður inn tíðliga við tiltøkum at steðga skúlafráveruni, skal tað eydnast at hjálpa næmingunum aftur í skúla.

Vit vita tó ikki, hví talið av føroyskum skúlanæmingum við skúlafráveru er vaksandi, hvørjar orsøkirnar eru, og hvussu fráverumynstrini eru. Hetta er vitan, sum er neyðug at hava, skulu vit tálma skeivu gongdini og fyribyrgja trupulleikanum í framtíðini. Vit vita heldur ikki hvørjar umskipanir skulu gerast, tillagingar og/ella hjálp og tiltøk teimum tørvar, fyri at skúlagongdin aftur skal koma í rættlag.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** *Skúlafráveran skal minka: ein 3 ára granskingarverkætlan*

### ENDAMÁL

At kanna orsakir handan øktu skúlafráveruna hjá føroyskum skúlanæmingum, og at kanna hvørji tiltøk og átøk innan skúlagátt kunnu minka um skúlafráveru, svarandi til lag 1, 2 og 3 á mynd á síðu 12.

### LÝSING

Verkætlanin verður bygd upp sum ein granskingarverkætlan. Úrslitini frá granskingarverkætlanini skulu brúkast til at bøta um verandi skrásetingaramboð og mannagongdir (bæði talgild amboð, mannagongdir og skipan í skúlunum), umframt at gera tilmæli og seta í verk tað, sum vísir seg hava gagnliga ávirkan á at minka um skúlafráveruna. Søkt verður eftir einum ph.d.-lesandi at fremja hesa granskingarverkætlan, undir vegleiðing av granskarum innan økið og í samstarvi við stovnar innan skúlaøkið.

**Kostnaður:** 1,2 mió. um árið í 3 ár, harav søkt verður um ein partfrá granskingargrunnum.

**Tíðarætlan:** 2023-2026

**Ábyrgd:** Nám, Sernám, Undirvísingarstýrið og ein hægri læristovnur/Námsvísindadeildin á Setrinum

# 8.3 Skjótari hjálp

**ÁTAK NR. 6:
LÍVSMEISTRAN**

### SNÁVINGARSTEINUR

Hóast Føroyar á nógvan hátt eru eitt av heimsins bestu londum at liva í (OECD kanning 2021, Fólkaheilsuráðið), so bendir nógv á, at børn og ung í Føroyum stríðast við sálarligar og kropsligar heilsutrupulleikar. Dømi um hetta eru langir bíðilistar á B&U, útreiðslur til heima- og sjúkraundirvísing, játtanin til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð er brúkt upp, fiti og ov lítil rørsla. Harafturat vísa lærarafelagið og skúlaleiðarafelagið á, at felagsskapurin í skúlanum tykist vera undir trýsti, eins og fleiri næmingar mistrívast og uppliva einsemi. Hetta eru rák, sum vit eisini síggja úti í heimi, og WHO sigur millum annað, at hetta eru viðurskifti, sum eiga at fáa hægstu raðfesting.

Vit vita, at trivnaður, heilsa, læring og tað at virka sum heild, ganga hond í hond, og sambært § 8 í Fólkaskúlalógini er heilsukunnleiki eitt kravt undirvísingarevni. Ábyrgdin at undirvísa í heilsukunnleika og at fremja trivnaðin liggur sambært lógarverkinum serliga á flokslæraranum. Avbjóðingin liggur tó í, at tørvur bæði er á dagfestari námsætlan innan heilsukunnleika, umframt at flokslærarin hevur atgongd til undirvísingartilfar og fær møguleika fyri at fáa førleikamenning í at undirvísa í heilsu og heilsutrupulleikum, sum nútímans samfelagið hevur við sær.

Tí síggja vit í dag í ov stóran mun, at hesar uppgávur verða royndar loystar sum einstakar verkætlanir, at aðrir fakbólkar koma inn um skúlagátt at undirvísa, ella at hetta er býtt á ymiskar lærugreinar. Hetta hevur ein vansa við sær, at ábyrgdin verður ógreið, og at hetta í ov lítlan mun kann brúkast í felagsskapskapandi virksemi í flokkinum. Ósemja tykist eisini vera um, hvørt foreldur ella skúli eiga ábyrgdina av at læra børn og ung um heilsu, trivnað, lívsvanar og atferð; og tá verður bæði sipað til tað kropsliga, sálarliga og sosiala øki.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** *At innføra fólkaheilsu og lívsmeistran – sum skipað innihald í flokslæraraarbeiðinum*

### ENDAMÁL

At fremja trivnað, sálarligan og kropsligan treystleika, læring, menning, sjálvsvirðið, góðar felagsskapir, samstarv og skúlagleði fyri bæði børn og vaksin.

### LÝSING

Arbeiðsbólkurin er sannførdur um, at tað at hjálpa og læra børn um heilsu og at meistra lívið er ein felags uppgáva hjá øllum, sum eru um barnið og tann unga, t.e. skúli, foreldur, frítíðarvirksemi, o.s.fr. Somuleiðis er arbeiðsbólkurin samdur um, at fleiri av teimum heilsuligu (kropsligu og sálarligu) og trivnaðarligu avbjóðingunum og trupulleikunum, sum børn og ung stríðast við, eru samfelagsskaptir og skulu loysast í mátanum vit skipa stovnar og virksemi, sum børn og ung ferðast í. Tó er neyðugt, at skúlin raðfestir hetta økið hægri, bæði við førleikamenning og tilfari, sum samsvara nútímans samfelagnum. Arbeiðsbólkurin mælir til, at skúlin átekur sær sín part av at arbeiða heilsu- og trivnaðarfremjandi, og at brúka tær skipaðu undirvísingargongdir og tilfar, sum longu eru ment her og úti í heimi, í hesum arbeiði. Somuleiðis mælir arbeiðsbólkurin til at veita førleikamenning og karmar fyri hesum arbeiði innan skúlagátt.

Bygt á royndir og gransking, mælir arbeiðsbólkurin í fyrsta lagi til, at hvør flokkur í skúlanum arbeiðir 1 tíma um vikuna við fólkaheilsu og lívsmeistran, og at tað er flokslærarin saman við flokstoyminum, sum hevur ábyrgdina. Tað er týdningarmikið, at tað

er flokslærarin, ella ein lærari, sum kennir flokkin væl, sum arbeiðir fyribyrgjandi og heilsufremjandi í flokkinum. Arbeiðsbólkurin mælir til, at arbeiðið við lívsmeistran er partur av vanliga flokslæraraarbeiðinum í flokkunum. Men í teimum førum, har næmingurin ikki megnar at vera í flokkinum, eigur eisini at vera møguleiki fyri at arbeiða við somu undirvísingargongdum í smærri bólkum, undir leiðslu av førleikastovuni.

Tað er umráðandi, at hesin tímin ikki verður lagdur oman á verandi tímatalvu hjá næmingunum, men verður partur av skipaða trivnaðararbeiðinum og kravdu undirvísingarevnunum í verandi lóg.

Royndir[3] í øðrum londum vísa á, at slík undirvísing er bæði gagnlig sum heilsufremjandi og sum fyribyrgjandi. Somuleiðis er hon eisini gagnlig fyri teir næmingar, sum longu stríðast við heilsu- og sálarligar trupulleikar, og hevur víst seg bæði at hava positivt árin á einstaklingin og felagsskapin.

Arbeiðsbólkurin mælir til at royna hesa skipan í miðdeild og hádeild í 2-3 skúlum, fyri at fáa nakrar royndir og møguleikar at gera tillagingar, áðrenn hetta verður sett í verk í øllum skúlaverkinum.

Mælt verður eisini til, at námsætlan innan evnið verður dagførd, og at tilfar og undirvísingargongdir, sum hava verið royndar í øðrum londum við góðum úrslitum, verður føroyskað og tillagað føroysk viðurskifti. Fyrireiking til at skipa lívsmeistran sum part av trivnaðararbeiðinum í fólkaskúlanum, kann partvíst samskipast við fyrireikingunum at innføra lívsmeistran sum part av lærugrein á miðnámi. (átak í tilmælinum „Ung við sálarligum og/ella sosialum avbjóðingum og útbúgving, 2021)

**Kostnaður:** uml. 350 túsund

**Tíðarætlan:** 2-3 ár

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Undirvísingarstýrið, Sernám, Nám og Námsvísindadeildin á Setrinum

### EFTIRMETING

Nám tekur stig til at eftirmeta, tillaga tilfar og gera undirvísingargongdir eftir vísindaligum leisti.

## ÁTAK NR. 7: SERFRØÐIN TÆTTARI KNÝTT AT SKÚLANUM/ BARNINUM

### SNÁVINGARSTEINUR

Atfinningar eru javnan frammi bæði frá fakfólkum í skúlunum og frá avvarðandi, at børn, ið hava tørv á sernámsfrøðiligum átøkum, ikki fáa neyðugu hjálpina í skúlanum. Hetta viðførir bæði, at børn í sínum skúlaumhvørvi ikki fáa neyðuga hjálpina at trívast, mennast og læra, og at starvsfólkini í skúlunum kunnu kenna tað trupult at røkja mongu sernámsfrøðiligu avbjóðingarnar og uppgávurnar uttan ítøkiliga sernámsfrøðiliga ráðgeving, stuðul og vitan á staðnum.

Foreldur at børnum við serligum tørvi hava í fjølmiðlunum og umvegis politikkarar, t.d. gjøgnum skrivligar fyrispurningar í Løgtinginum víst á, at tey nærum kenna seg slept upp á fjall, tá tað snýr seg um at fáa neyðugu hjálpina til børnini.

Hóast nógvar ymiskar skipanir eru settar í verk bæði innan og uttan fyri skúlaverkið, so sær tað út til at verða møtimikið og torført at fáa atgongd til røttu hjálpina. Tí mælir arbeiðsbólkurin til, at 'atkomuligheitin' og møguleikin til hjálp, stuðul og ráðgeving, eigur at gerast lættari og skjótari, og at hjálpin tí í mest møguligan mun eigur at verða staðsett í skúlunum og vera atkomulig á staðnum.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** *Serfrøðin tættari knýtt at skúlanum/barninum.*

### ENDAMÁL

Menna inkluderandi sernámsfrøði í ta almennu/ vanligu fólkaskúlaskipanina og almennu námsfrøðina.

3 Mental healt in schools: a manual. 9789290225652-eng.pdf (who.int)

## LÝSING

Mælt verður til, at sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligar skipanir vera mentar og skipaðar sum ein inkluderaður partur av almennu skúlaskipanini. Hugsað verður bæði um sernámsfrøðilig átøk sum t.d. serflokkar, og um at sernámsfrøðilig ráðgeving sum heild verður ment og møguliga umskipað soleiðis, at átøk verða ment og mett sum partur av vanligu almennu námsfrøðini í skúlanum. Eitt nú eiga sertilboð og teirra tilknýtið til vanliga flokkin/skúlan at vera styrkt, soleiðis at skipanirnar gerast smidligari, har tað gerst lættari at vera partur av báðum (*millumtilboð*). Hjálp, stuðul og ráðgeving eigur at verða veitt, sum ein partur av tí vanligu skúlaskipanini og innanvert hana. Miðað eigur eisini at verða ímóti, at t.d. serfrøðin á Sernámi verður partur av skúlaskipanini/skúlanum.

Inkluderandi (ser)námsfrøði merkir eisini, at vanliga skúlaskipanin og námsfrøðin leggur áherðslu á at írokna allar tættir í skúlaskipanini at fevna um allar næmingar.

Arbeiðsbólkurin hevur innlit í, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið er í eini tilgongd at nágreina og lýsa verandi sernámsfrøðiligu tænasturnar innan fólkaskúlaøkið, í fyrstu atløgu tænasturnar innan skúlaverkið og síðani samstarvið við aðrar geirar. Av tí at hetta arbeiðið er farið ígongd, velja vit í arbeiðsbólkinum ikki at koma við boðum upp á ítøkilig átøk, tó vilja vit viðmerkja, at vit taka undir við, at økið eigur at verða endurskoðað og tillagað.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at átakið um at menna inkluderandi sernámsfrøði í skúlanum og tættari at skúlunum, verður ein av grundsúlunum undir tí arbeiðinum eisini.

Hóast arbeiðsbólkurin ikki kemur við nøkrum ítøkiligum uppskoti til átøk, hava vit valt at taka hetta við í tilmælið. Tí vit í arbeiðsbólkinum hava brúkt nógva orku at viðgera evnið, og tí at hesin arbeiðsbólkurin fór til verka, áðrenn Barna- og útbúgvingarmálráðið fór undir at kanna sernámsfrøðiligu tænasturnar.

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Sernám, Gigni, Nám og Undirvísingarstýrið

## ÁTAK NR. 8: EFTIRÚTBÚGVING OG MENNING AV (SER) NÁMSFRØÐI Í ALMENNU FÓLKASKÚLASKIPANINI.

## SNÁVINGARSTEINUR

Í samsvari við tøkini í hesum tilmæli, sum snúgva seg um at økja sannlíkindini fyri, at avvarðandi skipanir megna at skipa so fyri, at børn við sálarligum og sosialum avbjóðingum trívast, mennast og læra í fólkaskúlanum, er eisini neyðugt at útbúgva og eftirútbúgva starvsfólk til hesa uppgávuna. Fyri áhaldandi at menna føroyska skúlaverkið er neyðugt at førleikamenna starvsfólkini javnt og samt, og at førleikamenningin bæði tekur støði í granskingargrundaðum og í føroyskum jørðildi. Til tess at røkka hesum málinum, er tørvur á bæði at styrkja námsfrøðiliga gransking í Føroyum, umframt at økja og styrkja um útbúgvingina og eftirútbúgvingina av lærarum og starvsfólkum í og kring skúlan. Hetta hevur ikki verið raðfest nóg høgt, samstundis sum at fleiri skeið og eftirútbúgvingar hava verið skipaðar, sum ikki í nóg stóran mun hava tikið útgangsstøði í teimum serligu føroysku viðurskiftunum. Tørvur er á at menna námsfrøðiliga og undirvísingarliga gransking í Føroyum, og at styrkja Námsvísindadeildina bæði fakliga og fíggjarliga, soleiðis at møguleiki verður at fáa fleiri og regluligar eftirútbúgvingar á Námsvísindadeildini. Tørvur er serliga á at økja um og menna sernámsfrøðiliga partin av lærararútbúgvingini, bæði sum kravd lærugrein og sum t.d. linjulærugrein. Harumframt eigur eftirútbúgving innan sernámsfrøði, t.d. serlæraraútbúgving at verða skipað sum skjótast.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** Útbúgving og eftirútbúgving av lærarum og starvsfólkum í og kring skúlan, sum ráðgeva, stuðla v.m. inn-

an inkluderandi sernámsfrøði, innan skipan av skúla og undirvísing við einum fjølbroyttum næmingahópi, og at økja um sernámsføðiliga partin á bæði lærara- og námsfrøðiligu útbúgvingini. Arbeiðsbólkurin mælir til at seta serlæraraútbúgving at byrja skúlaárið 2022/2023 á Námsvísindadeildini yvir 2 ár.

## ENDAMÁL

At veita granskingargrundaða og dagførda vitan, førleika at menna og fremja fjølbroytta undirvísing og skúlaskap við denti á inkluderandi sernámsfrøði. Um sernámsfrøðin skal mennast í skúlunum, so mugu fakfólkini eisini útbúgvast og eftirútbúgvast innan økið.

## LÝSING

Fyri at kunna menna ein inkluderandi skúla, har serfrøðin og sernámfrøðilig átøk verða knýtt tættari at skúlaumhvørvinum hjá barninum, er neyðugt at útbúgva og eftirútbúgva starvsfólk til hesa uppgávu. Í hesum sambandi er tað alneyðugt, at útbúgvingar og eftirútbúgvingar innan námsfrøði og skúlaskap taka útgangsstøði í føroyskum jørðildi, og í granskingargrundaðum tilfari á altjóða støði. Tískil eiga tílíkar útbúgvingar og eftirútbúgvingar at fara fram á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Tað eru umleið 10 ár síðani, at eftirútbúgving innan sernámsfrøði hevur verið, og javnan hevur eftirspurningur verið eftir slíkari eftirútbúgving. Eisini eigur at verða kannað um læraraútbúgvingin hevur nóg neyvt og nøktandi fokus á sernámsfrøði og inkluderandi skúlaskap, um tørvur er á, at hesin parturin skal fylla meira í sjálvari lærararútbúgvingini, og um eftirútbúgving møguliga á master/kandidat støði eigur at verða skipað innan hesi øki.

Fyri at kunna uppraðfesta útbúgvingar og eftirútbúgvingar av lærarum og øðrum starvsfólkum í fólkaskúlanum, krevst at tað verður raðfest fíggging til at menna námsfrøðiliga og undirvísingarliga gransking í Føroyum og at styrkja Námsvísindadeildina bæði fakliga og fíggjarliga, soleiðis at møguleiki verður at fáa fleiri og regluligar eftirútbúgvingar á Námsvísindadeildini. Tørvur er serliga á at økja um og menna sernámsfrøðiliga partin av lærararútbúgvingini, bæði sum kravt fak og sum t.d. linjufak. Harumframt eigur eftirútbúgving innan sernámsfrøði, t.d. serlæraraútbúgving at verða skipað sum skjótast. Samstundis eigur at verða gjørd ein raðfest skipan, so at tað áhaldandi eru eftirútbúgvingar eru í gongd.

**Kostnaður:** mettur kostnaður á leið 6 mió. kr. yvir 2 ár.

**Tíðarætlan:** Byrja 2023/2024

**Ábyrgd:** Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Undirvísingarstýrið og Fróðskaparsetrið.

## ÁTAK NR. 9: AT SAMSKIPA OG UPPRAÐFESTA UNDIRVÍSING UM SÁLARLIG VIÐURSKIFTI (PSYKOEDUKATIÓN) TIL BARNIÐ OG FORELDUR TEIRRA AFTANÁ, AT BARNIÐ HEVUR FINGIÐ STAÐFEST PSYKIATRISKA DIAGNOSU.

## SNÁVINGARSTEINUR

Største avbjóðingin hjá B&U í dag er bíðitíð. Bæði hvat viðvíkur at sleppa framat til útgreining, umframt at sleppa framat fleiri av bólkatilboðunum skjótt eftir lokna útgreining. B&U Psykiatri hevur sum útgangsstøði eitt breitt úrval av viðgerðartilboðum. Men aktuelt kann vera leingi ímillum, at tey ymsu tilboðini verða boðin út, tí tað ikki eru nóg nógv orka til at bjóða øll tilboðini út regluliga.

Harafturat vísir tað seg, at tað er eitt ávíst 'yvirlap' í onkrum av tilboðunum um psykoedukatión, sum ávikavist B&U Psykiatri og Almannaverkið bjóða út. Vit meta tískil, at um tilboðini um psykoedukatión vórðu betri samskipað tvørturum geirar, kundu tilboðini verið boðin út meira regluliga, og orkan var á henda hátt eisini betri gagnnýtt á báðum stovnum.

**Arbeiðsbólkurin mælir til:** *At betri samskipa og*

*uppraðfesta undirvísing um sálarlig viðurskifti (psykoedukatión) til barnið og teirra foreldur/avvarðandi, aftaná at barnið hevur fingið staðfest psykiatriska diagnosu.*

**Endamál:** At brynja, ráðgeva og stuðla børnum (og teirra foreldrum og avvarðandi), sum hava skerdar førleikar og/ella hava ein serligan tørv.

**Lýsing:** Tað at hava eitt barn við skerdum førleikum kann hava stóra ávirkan á restina av familjuni. Við jøvnum millumbili hevur verið at hoyrt, at foreldur kenna seg einsamøll og hjálparleys í mun til, hvussu tey kunnu hjálpa teirra barni best.

Aktuelt verða fleiri tilboð um psykoedukatión boðin út. Psykoedukatión er heitið fyri undirvísing fyri borgarum og teirra avvarðandi um evnir í sambandi við psykiatriskar trupulleikar. Avbjóðingar hava tó verið við at hava tilboðini nóg støðug og reglulig. Hetta merkir, at barnið og teirra foreldur/avvarðandi tíðum skulu bíða eftir tilboðnum um psykoedukatión aftaná lokna útgreining.

Tí mæla vit í arbeiðsbólkinum til at samskipa og uppraðfesta psykoedukatión bæði til barnið og til avvarðandi, soleiðis at foreldur og barn kunnu fáa vitan um diagnosuna skjótari aftaná lokna útgreining.

Arbeiðsbýtið millum geirarnar kann taka útgangstøði í hvørji tilboð longu eru á teim ymsu stovnunum, og síðan at menna tey enn meira. Sum dømi er ávís viðgerð somikið specialiserað, at einans B&U Psykiatri kann veita hesa. Men í øðrum førum finnast teir neyðugu førleikarnir longu innan aðrar geirar, og kunnu onnur tilboð tí liggja aðrastaðni. Eitt dømi um hetta er psykoedukatión um ADHD og autismu, sum bæði Almannavrkið og B&U Psykiatri aktuelt veita.

Her kundi eitt ávíst arbeiðsbýtið verið, at Almannaverkið átók sær ábyrgdina av undirvísing um menningarórógv so sum ADHD og autismu – møguliga við at víðka og styrkja um heimaráðgevingina í TGT tilboðnum. Meðan B&U Psykiatri kundi brúkt tær frígivnu „resursirnar“Upp á aðra meira psykiatriska viðgerð og psykoedukatión – t.d. bólkar fyri børn/ung við ótta og foreldur teirra.

Mælt verður til bæði at samskipa verandi tilboð og at uppraðfesta psykoedukatión. Við betri samskipan verður ábyrgdarbýtið greiðari millum stovnarnar, um hvør stovnur stendur fyri hvørjum tilboði. Við eini uppraðfesting kemur, at Almannaverkið kundi víðkað og styrkt um heimaráðgevingina í TGT tilboðnum. Tað eru 9 heimavegleiðarar settir í starv á Almannaverkinum, ið ráðgeva foreldur og børnum innan autismu og ADHD. Arbeiðsbólkurin mælir til at víðka tænastuna til fleiri bólkar, eitt nú menningartarn, sálarsjúku, fjølbrek, likamlig brek og møguliga aðrar sjúkur. Í hesum sambandi verður mett, at Almannaverkið í fyrstu atløgu hevur tørv á umleið 5-6 heimavegleiðarum afturat í starvi.

B&U Psykiatri kundi sett 2 starvsfólk burturav til at skipa tilboðið, veita psykoedukatión og til at framleiða/týða psykoedukativt tilfar til barnið og teirra avvarðandi.

**Kostnaður:** Almannaverkið hevur tørv á umleið 3-4 mió. kr. og Barna- og ungdómspsykiatriin hevur tørv á 2. mió. kr. (1 mió./ár)
**Tíðarætlan:** 2023-2025

**Ábyrgd:** AMR og HMR/BUMR

**Eftirmeting:** Eigur at verða eftirmett bæði í Almanna-verkinum og Barna- og ungdómspsykiatriini um 2 ár, samstundis sum mett verður um, hvat skal til fyri at hetta kann verða fastur partur av B&U og AV framyvir.

# 9. Keldulisti


Ainscow, M. (2020). Promoting inclusion and equity in education: lessons from international experiences. *Nordic Journal of Studies in Educational Policy*, *6*(1), 7-16 https://doi.org/10.1080/20020317.2020.1729587

Ainscow, M., Booth, T., Dyson, A., & Farrell, P. (2006). *Improving schools, developing inclusion*. Routledge. https://doi.org/10.4324/9780203967157

Allison, M. A., Attisha, E., & Council on School Health. (2019). The link between school attendance and good health. *Pediatrics, 143*(2), 1–13. https://doi.org/10.1542/peds.2018-3648

Anvik, Cecilie Høj & Waldahl, Ragnhild Holmen. (2016) Når noen må ta regien - Om unge med psykiske helseproblemer: utfordringer, tiltak og samhandling på Island, Færøyene og i Norge https://www.norden.org/no/publication/nar-noen-ma-ta-regien

Børns vilkår, 2020. Skolens tomme stole – Skolefravær set fra barnets perspektiv. https://bornsvilkar.dk/wp-content/uploads/2020/10/Skolefravaars_Rapport_2020_web_print.pdf

Elliott, J.G. & Place, M. (2017). Practitioner Review: School refusal: developments in conceptualisation and treatment since 2000. *The journal of Child Psychology and Psychiatry, vol 60, 1,* pp. 4-15.

Evidence based intervention from multi tier: https://www.oxfordclinicalpsych.com/view/10.1093/med:psych/9780199985296.001.0001/med-9780199985296

https://www.frontiersin.org/files/Articles/488855/feduc-04-00161-HTML/image_m/feduc-04-00161-g001.jpg

Farrell, P. (2004). School Psychologists: Making Inclusion a Reality for All. *School Psychology International*, *25*(1), 5-19. https://doi.org/10.1177/0143034304041500

Friend, M. (2019). Co-Teach! Building and sustaining effective classroom partnerships in inclusive schools. (3rd edition).

From absenteeism to attendance:
https://www.frontiersin.org/articles/10.3389/feduc.2019.00161/full

Gonzálvez, C., Kearney, C.A., Vicent, M., & Sanmartín, R. (2021). Assessing school attendance problems: A critical systematic review of questionnaires. International Journal of Educational Research, 105, pp 1-15.

Hansen, H.J. (2020). *Co – Teaching.* Forfatteren og Århus Universitets-forlag.

Heilsu- og innlendismálaráðið (2018). Heildarætlan fyri sálarliga heilsu í Føroyum
https://lms.cdn.fo/media/11577/120130-heilsu-og-innlendisma-lara-%C3%B0i%C3%B0-heildar%C3%A6tlan-innan-psykiatri_web.pdf?s=t4fcF0V2IsNzjLpGotnztRGdT6M

Houlberg, K. & Kollin, M.S. (2022). VIVEs kommunetal 2022.1: Folkeskoleelever i Østdanmark har mest fravær. *Det nationale forsknings og analysecenter for velfærd* (VIVE).

Kearney, C. A., & Graczyk, P. A. (2020). A Multidimensional, Multi-tiered System of Supports Model to Promote School Attendance and Address School Absenteeism. *Clinical Child and Family Psychology Review*, *23*(3), 316–337. https://doi.org/10.1007/s10567-020-00317-1
Kearney, C.A. (2021). Integrating Systemic and Analytic Approaches to School Attendance Problems: Synergistic Frameworks for Research and Policy Directions. Child & Youth Care Forum, 50: 701-742.

Kolouh-Söderlund, Lidija (2019). Adolescent Health in the Nordic Region - Health promotion in school setting, Nordic welfare center.
https://www.diva-portal.org/smash/get/diva2:1429449/FULLTEXT01.pdf

Kunngerð nr. 95 frá 2. juli 2019 um Førleikastovur.

Kunngerð nr. 127 frá 12. septembur 2018 um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul.

KUNNGERÐ NR. 6 FRÁ 16. JANUAR 1992 UM ST-SAMTYKT FRÁ 20. NOVEMBER 1989 UM RÆTTINDI BARNSINS
barnaraettindasattmalin-tyding-11-2-2015.pdf (d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net)

Lund, Gro Emmertsen (2021). Fra fravær til fællesskab. Hvad kan skolen gøre. Aarhus Universitetsforlag.

Løgmansskrivstovan (2022). Heildarætlan - um at tálma og fyribyrgja rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028
https://lms.cdn.fo/media/16387/heildar%C3%A6tlan-um-at-fyribyrgja-og-t%C3%A1lma-r%C3%BAsevnismisn%C3%BDtslu-%C3%AD-f%C3%B8royum.pdf?s=A17MB_moRGG7slbLhEnKGBB5KFs

Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022.
Lógasavn (logir.fo)

Námsfrøðilig stevnumið - Uttanríkis- og mentamálaráðið (ummr.fo)
https://lms.cdn.fo/media/8504/108065-na-msfr%C3%B8%C3%B0ilig-stevnumi%C3%B0-fyri-dagstovnar.pdf?s=y7qAPA4-mhMneWbH9Rg4f62BB6A

Poulsen, Frida (2020) *Inklusjón og inkluderandi skúlar. Felags fatan av hugtakinum inklusion og inkluderandi skúlaskapi*

Poulsen, Frida (2021) Evnisdegi um inklusjón og inkluderandi skúlar 25. august 2021 á Námsvísindadeildini https://www.setur.fo/fo/setrid/tidindi/evnisdagur-um-inklusjon-i-skulanum/

Sommer, D.: RESILIENS, FORSKNING-BEGREBER-MODELLER, I Psyko & Logos, 2011, nr 32, s. 372-394.

Sommer, D.: PÅ JAGT EFTER BØRNEPERSPEKTIVET OG BØRNS PERSPEKTIVER – Begrebsafklaring af et historisk-kulturelt menneskesyn, I Kognition & Pædagogik - Tidsskrift om gode læringsmiljøer, nr. 118, 2020

SSP-sáttmálin 2020

Tanner-Smith, E.E. & Wilson, S.J. (2013). A Meta-analysis of the Effects of Dropout Prevention Programs on School Absenteeism, *Prevention Science, vol 14*, pp 468-478.

Tilmælið frá fólkaskúlaráðnum um sernámsfrøði, 2011.
2011.06 Tilmæli um sernámsfrøði.pdf (lms.fo)

Tilmæli um sernámsfrøðiliga økið innan fólkaskúlaøkið, 2014.
tilmæli-um-sern-økið-innan-fólkaskúlaøkið-230614.pdf (lms.fo)

Undervisningministeriet (2014). Ro og klasseledelse i folkeskolen – rapport fra ekspertgruppen om ro og klasseledelse, s. 1-67, Sønergaard, D.M. et al., Undervisningsministeriet, www.uvm.dk/rorapport

Upprit um Førleikastovur 2012 - grundað á tilmælið um serundirvísing, juni 2011. Fólkaskúlaráðið.
Upprit um førleikastovur (cdn.fo)

Uttanríkis- og mentamálaráðið (2021). UNG - við sálarligum og/ella sosialum avbjóðingum og útbúgving
https://lms.cdn.fo/media/15976/tilm%C3%A6li_ung_salarligumtsosialum-002-171121-kl-2013-endaligt.pdf?s=dQn3i4PCgJPzDxJ9MasIwPOsOb8

Vakstrarforum: ‘parturin: Arbeiðsmarknaður og útbúgving.
Arbeiðsmarknaðurin og útbugving v4 (002).pdf

Warming, Hanne: Børneperspektiv - en populær flydende betegner, I nordisk tidsskrift for pedagogikk og kritikk, Volum 5, Børneperspektiv, 2019, 2. 62-76. (Peer-reviewed article)

Werner, E., & Smith, R. (1977). Kauai's children come of age. Honululu: University of Hawaii Press.

World Health Organisation (2021). Mental health in schools: a manual
9789290225652-eng.pdf (who.int)

FØROYA LANDSSTÝRI